| 11 | | Skrivliga uppgávan latin inn | | | | |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | (2. og 3. Flokkur) | | | | |
| 1 2 | | Framløga og kjak um uppgávuna - próvdøming (2. og 3. flokkur) | | | | |

## Grundbøkur

| Stytting | Lærubók |
|---|---|
| B1 | Alisfrøði og evnafrøði 1 (B1): Lærubók: PólJespersen (Føroya Skúlabókagrunnur |
| B2 | Alisfrøði og evnafrøði 2 (B2): Lærubók: PólJespersen (Føroya Skúlabókagrunnur |
| B3 | Alisfrøði og evnafrøði 3 (B3):: PólJespersen (Føroya Skúlabókagrunnur |
| | Egið gjørt tilfar (Jacob Thomsen) |
| AE | Alis og evnafrøði til studendaskúla og HF-skeið: Pól Jespersen ( NÁM) |
| OrB | Orbit B stx, ISBN 978-87-616-8675-6 (Systime) |

## Aðrir upplýsingar

- **Alis og evnafrøði 1**
- Roynd 1:
- Skrivliga roynd í fakligum pensum (uttanhýsis próvdómari)
-
- Roynd 1:

  Munnlig roynd : Fara til próvtøku eftir nýggjum leisti, har næmingarnir velja spurningin dagin fyri sjálvan próvtøkudagin (uttanhýsis próvdómari)

- - Starvsstovuroyndir
- - Námsætlan
- - Interaktivar animatiónir

- Uppgeva eitt ávíst tal av kendum venjingum.
- Næmingarnir draga ein spurning
- - gera verkligar venjingar knýttar at spurninginum
- - lýsa alis ella evnafrøðina, ið er tengd at tí, ið gjørt verður verkligt
- - greiða frá hvussu teir kundu hugsað sær at undirvíst í hesum evni.

- **Alis og evnafrøði 2**
- Roynd 2:
- Skrivliga roynd í fakligum pensum (uttanhýsis próvdámari)

- Roynd 2:

  Munnlig roynd : Fara til próvtøku eftir nýggjum leisti, har næmingarnir velja spurningin dagin fyri sjálvan próvtøkudagin (uttanhýsis próvdómari)

- - Starvsstovuroyndir
- - Námsætlan
- - Interaktivar animatiónir

- Uppgeva eitt ávíst tal av kendum venjingum.
- Næmingarnir draga ein spurning
- - gera verkligar venjingar knýttar at spurninginum
- - lýsa alis ella evnafrøðina, ið er tengd at tí, ið gjørt verður verkligt
- - greiða frá hvussu teir kundu hugsað sær at undirvíst í hesum evni.

- **Alis og evnafrøði 3E** (uttanhýsis próvdómari)

- Mál- Vísindaligar greinar

- Skrivlig uppgáva latin inn og munnlig próvtøka. (Lata uppgávu inn, framløga og kjak)

- Verkætlan:
- Skriva eina uppgávu.
- Innihald
- - Undirvísingarætlan grundað á ástøðið.
- - Undirvísingarætlan roynd í starvslærunitíðini
- - Undirvísingin verður eftirmett í mun til ætlanina og hvussu tað gekk.

- Framløga av undirvísingarætlan

# SKEIÐSHEITI

Náttúru og tøkni (alis/evnafrøði)

*Lestrarárið 2021/2022*

Skeiðsnummar: 7479.19

Undirvísari

Jacob Thomsen jatho@kallnet.fo

## Skeiðslýsing Heyst 2021 og vár 2022
## *Course description*

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar**<br>***Course number*** | 7479.19 |
| **Heiti**<br>***Title*** | N&T (Alisfrøði og evnafrøði) |
| **ECTS**<br>***ECTS*** | 7½ |
| **Fortreytir**<br>***Prerequisites*** | Treytin fyri at taka skeiðið er, at tann lesandi er innskrivað/ur til lestur á Námsvísindadeildini |
| **Stig**<br>***Level*** | BEd. stig |
| **Endamál**<br>***Purpose*** | At tey lesandi ogna sær bæði fakligar og didaktiskar førleikar at undirvísa í evna- & alisfrøði, og í tøkni til lærugreinina Náttúra og Tøkni, og at tey brúka náttúruvísindaligar hættir at eygleiða og skráseta náttúrufyribrigdi |
| **Innihald**<br>***Content*** | **Grundleggjandi evnafrøði**: Grundevnaskipanin, atom, mýl og jonir. Sambindingar, støðuformar (tilstandsformer), brenning, sýrur, lútar (basur) og matur.<br><br>**Grundleggjandi alisfrøði**: Støddir og mál, evnisnøgd, kreftir, magnetisma, el-læra, orka, orkukeldur.Vatn, luft og trýst. Ljós og ljóð. Í hesi samband verður eisini nomið við ymsa nýtslu av tøkni. |
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>***Learning and teaching approaches*** | Floksundirvísing, venjingar og framløgur. Stórur dentur verður lagdur á venjingar, sum eru grundaðar á tey náttúrufyribrigdi, sum verða viðgjørd í ástøðiliga partinum. Dentur verður lagdur á, at eisini tey lesandi sjálvi úthugsa venjingar sum kunnu brúkast at lýsa ástøðiliga tilfarið. |
| **Læruúrtøka**<br>***Learning outcomes*** | 1) At leggja til rættis, gjøgnumføra og eftirmeta eina undirvísing har næmingarnir eru virknir, og sum hóskar til tey evni í námsætlanum fólkaskúlans fyri náttúru og tøkni, sum fevna um evna- & alisfrøði, umframt tøkni. 2) At knýta evna- og alisfrøðilig viðurskifti saman við náttúru- og landafrøði. 3) At lýsa og greina grundleggjandi evni innan evna-og alisfrøði umframt tøkni. |

| | |
|---|---|
| **Próvtøkuháttur**<br>***Assessment method*** | Fyri at standa skeiðið skal lesandi hava uppfylt møti- og luttøkuskyldina til tilrættisløgdu undirvísingina og starvslæruna., |
| **Próvdøming**<br>***Examination*** | Innanhýsis próvtalastigi staðið/ikki staðið<br>Eisini skal lesandi standa skrivliga verkætlanar-uppgávu um starvslæruna, har próvtal verður givið |
| **Próvtalastigi**<br>***Marking scale*** | 7-tals stigin |
| **Lestrarlisti**<br>***Bibliography*** | Tilfar úr bókunum hjá Pól Jepersen: Alisfrøði og evnafrøði 1 og 2- Tilfar av netinum – Náttúra og Tøkni 1, 2 og 3 - - Óútgivið egið tilfar frá Jacob Thomsen (Royndarhefti) |
| **Ábyrgd/*Contact*** | Erla Olsen & Jacob Thomsen |

**Undirvísingin var hósdagar frá kl 12.00 – 14.30**

| Vika | Dagur | Evni | Dagsætlan |
|---|---|---|---|
| 35 | Hósd.<br>2/9 | Sjónin – eyga<br>Litir | Ástøði og verkligar royndir – brúka linsur og annað tilfar - brillur – luppur – kikari. Brúka “ljósboks” |
| 36 | Hósd.<br>9/9 | Uppafturtøka um ljós<br>Hoyrnin - ljóð | Ástøði og verkligar royndir. Gera “telefon” – stilligaflar – royndir við ljóðferð – ferðmáling við “timara” |
| 37 | Hósd.<br>16/9 | Uppaftur tøka um ljóð | Ferðbroyting (“acceleratión”) - eindir fyri ferð |
| 38 | Hósd.<br>23/9 | Jørðin bástaður okkara | Ástøði og verkligar royndir - Tyngdarkraft – royndir við kraftmálara (“Newtonmetri”) |
| 39 | Hósd.<br>30/9 | Stjørnuhimmalin | Gongustjørnurnar (PP)<br>Atdráttarmegi(sól/gongustjørnur – jørð/máni) – felagsroynd<br>Sólsetur (felagsroynd)<br>Kvartalskifti mánans (PP)<br>Nærmingar gera “stjørnuur<br>Stjørnutekn (PP) |
| | | **EVNISVIKA** | |
| | | HEYSTSTEÐGUR | |
| 42 | Hósd.<br>21/10 | Stjørnuhimmali | Uppafturtøka og framhald frá viku 39 |
| 43 | Hósd.<br>28/10 | Støðuravmagn (statiskt el) | Ástøði – verkligar royndir við plastrøri (“elektrikararør) – glimlampu – ballón<br>Positiv og negativ løðing |
| 44 | Hósd.<br>4/11 | Streymkeldur | Verligt: gera egna streymkeldu og brúka voltmetur. Fáa peru (1,5) at lýsa |
| 45 | Hósd.<br>11/11 | Streymur og el-orka | Verkligar royndir við spenningi(V), streymstyrki (A) og Effekt (W). Ohmsa lóg |
| 46. | Hósd.<br>18/11 | El-leiðarar<br>Rað- tvør- og stuttbinding | Verkligar royndir:”Hvat leiðir streym”<br>Verkligar royndir um rað - ,tvør - , og stuttbindingar |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 47 | Hósd.<br>25/11 | Spenningur, streymstyrki og mótstøður | Verkligar royndir um mótstøðu í “lummalykta perum”.<br>Mótstøða og hiti. Loysa ástøðiligar uppgávur. |
| 48 | Hósd.<br>2/12 | Magnetisma | Ástøði.<br>Verkligar royndir við magnetum – hvørji evni kann ein magnet taka at sær? At magneta sagablað (pólar)<br>Roynd við elektromagnetum |
| 49 | Hósd.<br>9/12 | Luft, vatn og trýst | Ástøði um trýst<br>Felagsroyndir við “vakumklokku”<br>Verkligar royndir við vatni og trýsti<br>Verkligar royndir við yvirtrýsti og undirtrýsti |
| 50 | Hósd.<br>16/12 | Ísur, vatn og vatndampur | Ástøði (Celsius, Fahrenheit og Kelvin)<br>Verkligar roynsir: Bráðmarkið hjá ísi<br>Kuldablanding<br>Ringrásin hjá vatni |
| 51<br>52 | **JÓLASTEÐGUR** | | |
| 1 | Hósd.<br>6/1 | Ísur, vatn og vatndampur<br>At reinsa vatn | Framhald frá viku 50<br>Verklig roynd at “destillera” salt og “skitið” vatn |
| 2 | Hósd.<br>13/1 | Grundevni og evnabindingar | Byggja fyrimyndir av mýlum (brúka byggisett av kúlum, sum ímynda atom)<br>Royndir við oxygen og koldioxid (inn – og útandingarluft)<br>Brenning |
| 3 | Hósd.<br>20/1 | Sølt, súrur, lútar | Royndir, ið næmingarnir venja sjálvir |
| 4 | Týsd.<br>25/ | Próvtøka | Landafrøði |
| 5 | Hósd.<br>3/3 | Fyrireiking til starvslæruna | |
| 6 | Starvslæra (2., 3. og 4.fl) | | |
| 7 | Starvslæra (2., 3. og 4.fl)<br>Vitja 4. flokk | | |
| 8 | Starvslæra (2., 3. og 4.fl)<br>Vitja 2. Og 3 flokk | | |
| 9 | Starvslæra (2.og 3.fl)<br>4. Flokkur skrivar uppgávu (vitja 2. og 3.flokk) | | |

| | |
|---|---|
| 10 | Starvslæra (2.og 3.fl)<br>Próvtøka 4. flokkur |
| 11 | 2. og 3 flokkur skriva uppgávu |
| 12 | Próvtøka 2. og 3. flokkur |

**Høvuðsbókmentir:**

- Tilfar úr bókunum hjá Pól Jepersen: Alisfrøði og evnafrøði 1 og 2-
- Tilfar av netinum
- Náttúra og Tøkni 1, 2 og 3
- Óútgivið egið tilfar frá Jacob Thomsen (Royndarhefti)

# Náttúru- og tøkni Geografisk sjónarhorn

*Lestrarárið 2021/2022*

Skeiðsnummar: 6475.21

Undirvísari

Sigurd Nordendal

August 2021

Góði lesandi

Skeiðið í N&T er í fýra pørtum

- Landafrøði (20 námsstig)
- Lívfrøði (10 námsstig)
- Alis- og evnafrøði (10 námsstig)
- Starvslæra (10 námsstig)

Eg, Sigurd Nordendal, skal undirvísa tykkum í geografi – ella í "*Náttúra & tøkni - geografisk sjónarhorn",* ið eg havi valt at rópa skeiðið.

- Skeiðið byrjar 31/8 -2021týsdag og endar og endar 10/1-2022 týsdag

Próvtøka er týsdag 17/1.2022

Undirvísing er

- Týsdag kl 10 -14

Undirvísingarhølið er stova 63

Ì hesum faldara kanst tú kunna teg um:

- Endamálið við skeiðnum (Endamálið er lýst í eini skeiðslýsing, ið setur orð á læruúrtøku, innihald, undirvísingarhættir og eftirmetingarhættir v.m.)

## Skeiðslýsing Heyst 2021
## *Course description*

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar** *Course number* | 6475.21 |
| **Heiti** *Title* | **Náttúra og tøkni** **Geografisk sjónarhorn** *Nature and technology* *Geographical perspectives* |
| **ECTS** *ECTS* | 15 |
| **Fortreytir** *Prerequisites* | Treytin fyri at taka skeiðið er at tann lesandi er innskrivað/ur til lestur á námsvísindadeildini |
| **Stig** *Level* | Bachelor |
| **Endamál** *Purpose* | Endamálið er at tey lesandi skulu arbeiða við náttúruspurningum og menniskjaliga samspælið við náttúruna |
| **Innihald** *Content* | Skeiðið er í 5 høvuðspørtum: |

Heimstaðurin
- Jarðfrøði
- Náttúran
- Umhvørvið

Heimurin uttan um okkum
- Norðurlond og Evropa
- Veðrið
- Veðurlagið
- Veðurlagsbeltir
- Rúmdin

Samspæl menniskjunar við náttúruna
- Veðurlagsbroytingar
- Náttúruvernd
- Varandi orkukeldur

Náttúrufrøði og tøkni
- Kortlæra
- Topografisk kort

Náttúrufaksdidaktikkur:

- Avmarkingar og møguleikar í fakligum og fakdidaktiskum samanhangum
- Ymsir arbeiðs- og hugsunarhættir
- Næmingalagað undirvísing og ymiskar undirvísingargongdir
- Viðkomandi undirvísingartilfar

| | |
|---|---|
| **Læru- og undirvísingarhættir** *Learning and teaching approaches* | Undirvísarin nýtir undirvísingarhættir og venjingar, ið hava til endamáls, at tey lesandi læra at gera undirvísingargongdir, umframt at meta um og eftirmeta tær.<br><br>Dentur verður lagdur á, at undirvísingargongdir skulu fevna um ymisk læringsvirksemi sum lærarframløgur, útferðir, bólkaarbeiði av ymiskum slagi, tey lesandi savna og gera tilfar talgilt. Tilgongdirnar skulu til samans gera tey lesandi før fyri at fremja eina virkna undirvísing í geografiska partinum av náttúru og tøkni. |
| **Læruúrtøka** *Learning outcomes* | Tá skeiðið er lokið skal tann lesandi megna at:<br><br>- fyrireika og fremja motiverandi og hugkveikjandi undirvísing í náttúru og tøkni eftir galdandi námsætlan, umframt at meta um og eftirmeta hesa undirvísing<br>- lýsa og diskutera valda geografiska sjónarhorn í samband við úrvald undirvísingarevni<br>- hugleiða fakliga og fakdidaktiskt um, hvussu náttúrufaksundirvísing kann leggjast til rættis og fremjast í verki<br>- meta um, hvørjir møguleikar og hvørjar avmarkingar eru knýttar at júst undirvísingini í N&T |
| **Prótøkuháttur** *Assessment method* | Gjøgnum skeiðið hava tey lesandi framløgur og smærri skrivligar uppgávur, sum skulu vera svaraðar og góðtiknar fyri at standa skeiðið.<br><br>Sjálv prótøkan byggir á skrivligt avrik við munnligari verju. Í avrikinum skulu tey lesandi lýsa eina undirvísingargongd í miðdeild fólkaskúlans.<br><br>*(Prótøkuhátturin verður neyvari lýstur í einum serstøkum skjali).* |
| **Próvdøming** *Examination* | Uttanhýsis próvdøming |
| **Próvtalastigi** *Marking scale* | 7 - talsstigin |

| | |
|---|---|
| **Lestrarlisti** ***Bibliography*** | Er tøkur, tá ið skeiðið byrjar. Tilfar verður lagt út á Moodle so hvørt. |
| **Ábyrgd/*Contact*** | Sigurd Nordendal |

# Lestrarætlan

| 35 | Týsdag 31/8 |
| --- | --- |
| 1 | Skeiðslýsing og jarðfrøði |
| | https://namsaetlanir.fo/folkaskuli/kravdar-laerugreinar/nattura-og-toekni-4-6/<br><br>leinkjan er um almenna jarðfrøði - https://jf.fo/laer-um-jardfrodi/almenn-jardfrodi/hvussu-verdur-magma-til/<br><br>Leinkjan er um grótsløg - https://jf.fo/laer-um-jardfrodi/grotslog/<br><br>Leinkjan er um gosgrýti - https://jf.fo/laer-um-jardfrodi/grotslog/gosgryti/<br><br>Leinkjan er um legugrýti - https://jf.fo/laer-um-jardfrodi/grotslog/legugryti/<br><br>Leinkjan er um mineral - https://jf.fo/laer-um-jardfrodi/steinslog-2/<br><br>Leinkjan er um upprunamineral - https://jf.fo/laer-um-jardfrodi/steinslog-2/upprunasteinslog/ |

| 36 | Týsdag 7/9 |
| --- | --- |
| 2 | Jarðfrøði og náttúran í Føroyum |
| | Jarðfrøði og geomorfologi í Suðuroy (2021) Mortensen L. s. 1-9, s.12, s.15-17, s.21-22, s.24-25, s.28-39, Jarðfeingi<br><br>Den dynamiske jord (2021) https://www.geus.dk/media/8085/ddj.pdf s.1-32 GEUS.DK |

| 37 | Týsdag 14/9 |
| --- | --- |
| 3 | Jarðfrøði, Tjóðsavnið í Hoyvík og Nám |
| | Geografididaktikk for klasserommet (2019) Mikkelsen og Sætre et.al, s.160-194, Cappelen Damm akademisk |

| | |
|---|---|
| | Natur/teknologi didaktik (2020) Hyllested, Trine, s.131-132, Hans Reitzels forlag |

| **38** | **Týsdag 21/9** |
|---|---|
| 4 | Jarðfrøði og fakdidaktikk |
| | Natur/teknologi didaktik (2020) Hyllested, Trine, s.19-43, Hans Reitzels forlag |

| **39** | **Týsdag 28/9** |
|---|---|
| 5 | Veðrið og veðurlag |
| | Mangelsen et.al (2015) Naturgeografi-vores verden, s.243-267, GO forlag |

| 40 | Evnisvika – Granskingargrundað undirvísing | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag |
| Serlig skrá | | | | | |

| 41 | Heyststeðgur |
|---|---|

| **42** | **Týsdag 19/10** |
|---|---|
| 6 | Veðrið og veðurlag |
| | Leinkja til gransking fyri børn í náttúru og tøkni:<br>https://www.nysgjerrigper.no/undrelaboratoriet/om-undrelaboratoriet/<br><br>Mangelsen et.al (2015) Naturgeografi-vores verden, s.243-267, GO forlag |

| **43** | **Týsdag 26/10** |
|---|---|
| 7 | Havið og veðurlagsbroytingar |
| | Mangelsen et.al (2015) Naturgeografi-vores verden, s.15-35, GO forlag |

| **44** | **Týsdag 2/11** |
|---|---|
| 8 | Náttúruvernd |
| | Hugsa dømi – náttúruvart øki við útgangsstøði í Vágum (2019) framløga á savnsdøgum í Vágum um náttúruvernd, Nordendal S. |

| | |
|---|---|
| | Klassifisering av náttúruøkjum eftir IUCN:<br>https://www.iucn.org/theme/protected-areas/about/protected-area-categories<br>https://logir.fo/Logtingslog/48-fra-09-07-1970-um-natturufriding-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-110-fra-29<br><br>Frøði 2013/2 s.20-22 og s.37-39 |
| **45** | **Týsdag 9/11** |
| 9 | Havið |
| | Havið (2000) Hansen, B, s.65-95, Nám |

| **46** | **Týsdag 16/11** |
|---|---|
| 10 | Gáttafirðir |
| | Havið (2000) Hansen, B, s.157-172, Nám<br><br>Natur/teknologi didaktik (2020) Hyllested, Trine, s.123-151, Hans Reitzels forlag |

| **47** | **Týsdag 23/11** |
|---|---|
| 10 | Orka og varandi orka |
| | Mangelsen et.al (2015) Naturgeografi-vores verden, s.279-293, GO forlag |

| **48** | **Týsdag 30/11** |
|---|---|
| 11 | Klaksvík námsferð |
| | Natur/teknologi didaktik (2020) Hyllested, Trine, s.187-190, Hans Reitzels forlag<br><br>Ístíðarlandslagið:<br>https://kvf.fo/netvarp/sv/2017/10/30/20171030lismortensen |

| 48 | Mikudag 1/12 |
|---|---|
| 12 | Suðuroy námsferð |
| | Jarðfrøði og geomorfologi í Suðuroy (2021) Mortensen L. s. 1-9, s.12, s.15-17, s.21-22, s.24-25, s.28-39, Jarðfeingi |

| 49 | Týsdag 7/12 |
|---|---|
| 13 | Topografisk kort |
| | Geografididaktikk for klasserommet (2019) Mikkelsen og Sætre et.al, s.116-136, Cappelen Damm akademisk |
| **50** | **Týsdag 14/12** |
| 12 | At eftirmeta undirvísing í náttúru og tøkni |
| | Natur/teknologi didaktik (2020) Hyllested, Trine, s.133-151, Hans Reitzels forlag |

| 1 | Týsdag 4/1 |
|---|---|
| 13 | Vegleiðing í samband við uppgávuskriving - próvtøka |
| | Natur/teknologi didaktik (2020) Hyllested, Trine, s.123-132, Hans Reitzels forlag |

| 2 | Týsdag 11/1 |
|---|---|
| 14 | Próvtøka skrivligt |

| 3 | Týsdag 18/1 |
|---|---|
| 15 | Próvtøka munnligt |

# Náttúra og Tøkni - lívfrøði

*Lestrarárið 2021/2022*

Skeiðsnummar: 6476.21

Undirvísarar
William Simonsen

August 2021

Góði lesandi

Vælkomin til skeiðið Náttúra og Tøkni - lívfrøði (stuttstavað N&T). Skeiðið byrjar hósdagin **02/09-2021** og endar **21/1-2022**

Vit eru í skúla

- hósdag kl. 09.00 – 11:30

Undirvísingarhølið er skúlastova nummar 61 á **Námsvísindadeildini.**

Endamálið við "N&T - lívfrøði" er stutt sagt at geva tær innlit í og forstáðilsi av grundleggjandi hugtøkum og tilgongdum innan lívfrøðina; eisini verður orka løgd í "praktiskar royndir"

Í hesum lítla faldara kanst tú kunna teg um:

- Endamálið við skeiðnum - Endamálið er lýst í eini sokallaðari **ECTS-skeiðslýsing**, ið setur orð á læruúrtøku, innihald, undirvísingarhættir, eftirmetingarhættir osfr..
- 
- **Undirvísingarætlan** fyri skeiðið. - Her fært tú at vita, hvussu fyrstu vikurnar av skeiðnum verða skipaðar, og hvat tú skalt lesa frá degi til dags.

Tú skalt keypa eina grundbøk.

Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget.

Hin útgávan: Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2021): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget.

Bøkin er at fáa í Rit & Rák í SMS.

Aðrir tekstir, ið tit skulu lesa hetta skeiðið, liggja inni á Moodle (sí lestrarætlan). PP-framløgur verða somuleiðis lagdar inn á Moodle so hvørt.

## Skeiðslýsing — Heyst 2021
## *Course description*

| | |
|---|---|
| **Skeiðsnummar** *Course number* | 6476.21 |
| **Heiti** *Title* | Náttúra og Tøkni – lívfrøði<br><br>(Nature and technology – Biology) |
| **ECTS** *ECTS* | 7½ |
| **Fortreytir** *Prerequisites* | Treytin fyri at taka skeiðið er, at tann lesandi er innskrivað/ur til lestur á Námsvísindadeildini |
| **Stig** *Level* | Bachelor |
| **Endamál** *Purpose* | Endamálið við skeiðnum er at gera tann lesandi kunnugan við fakið lívfrøði. Lesandi fáa eitt innlit í og eina fatan av grundleggjandi hugtøkum og tilgongdum í lívfrøði sum bæði vísindagrein og sum undirvísingarfaki. Harumframt verður strembað eftir, at tey lesandi skulu fáa høvi at gera nógvar praktiskar royndir<br><br>Førleikarnir, ið tey lesandi menna hetta skeiðið, skal geva teimum eina barlast, ið tey skulu nýta bæði sum fólkaskúlalærarar og í øðrum samanhangum, har lívfrøðilig viðurskifti verða umrødd. |
| **Innihald** *Content* | Skeiðið er í 14 pørtum. Hvør partur hevur sítt egna evnisinnihald. Partarnir byggja á hvønn annan, og teir verða leinkjaðir sum frá líður. Partarnir eru hesir:<br><br>- Lívfrøði í grunddeildini<br>- At læra í náttúruni og av náttúruni<br>- Kykna og lívsprosessur<br>- Økologi<br>- Menningargongd (evolusion)<br>- Soppur<br>- Plantur<br>- Djór og djóralív<br>- Undirvísing í burðardyggleika<br>- Seksualitetur og nøring<br>- Sodning<br>- Nervalag og sansir |

- Beinagrind og vøddar
- Ringrásir – blóðæðrar, lungini og lymfurnar

| | |
|---|---|
| **Læru- og undirvísingarhættir**<br>***Learning and teaching approaches*** | Fyrilestrar, filmar og animatiónir, bólkaarbeiði, starvstovuarbeiði, og vitjan á/frá viðkomandi stovni/virki o.ø. |
| **Læruúrtøka**<br>***Learning outcomes*** | Við skeiðslok skal tann lesandi megna at<br>• greiða frá ymisku sløgunum av livandi kyknum, og hvat krevst fyri at nakað er livandi<br>• greiða frá, hvat DNA er, og hvat ein ílega er.<br>• greiða frá, um kyknudeiling og proteinsyntesu<br>• greiða frá, hvat ein vistskipan er<br>• greiða frá teimum faktorum (lívrunnir og ólívrunnir) í skapa eina vistskipan<br>• greiða frá, hvar vit fáa orkuna frá (ljóssamevning)<br>• meta um, hvat hóttir okkara lív og vistskipanir, og um nakað kann gerast fyri at bøta um støðuna<br>• at geva eina mynd av margfeldinum av djórasløgum, og leggja dent á, hvussu skap og snið homgur saman við teirra livihátti<br>• greiða frá, hvat lívmenning (evolusjon) snýr seg um og lýsa hugtøk sum náttúrulig útveljan og tillagan<br>• greiða frá teim ymisku skipanunum, ið kroppurin er gjørdur av, og hví vit tørva hesar skipanir – sodningarlagið, kynsgøgn og barnsburður, nervaskipanina, beinagrind og vøddar, blóðrensl og andadrátt.<br>• fremja ymiskar praktiskar royndir og kjakast um, hvussu hesar kunnu nýtst í undirvísingini í N&T í fólkaskúlanum<br>• at kunna stíga fram og halda stytti framløgur um úrvald evnir. |
| **Próvtøkuháttur**<br>***Assessment method*** | Próvtøkan er í tveimum pørtum.<br>Próvtøkan verður seint í januar mánaða 2022. Próvtøkan verður skrivlig. Próvtøkan verður neyvari lýst í sjálvstøðugum skjali. |
| **Próvdøming**<br>***Examination*** | Uttanhýsis próvdøming |

| | |
|---|---|
| **Próvtalastigi**<br>***Marking scale*** | Galdandi próvtalsstigi |
| **Bókmentir** | Tit fáa lestrarlistan, áðrenn skeiðið byrjar |
| **Ábyrgd/*Contact*** | William Simonsen & Erla Olsen |

# Lestraræ tlan

| 35 | Hósdagur 2. sept | Dag og dato |
|---|---|---|
| 1 | **Biologi på barnetrinnet.Hvordan få et godt møte?**<br>**Å lære i og av naturen** | Dagsins tema |
| | Kap. 1 og 2. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget.<br>Kap. 1 í hinari útgávuni | Bókmentalisti |

| 36 | Hósdagur 9. Sept | Dag og dato |
|---|---|---|
| 2 | **Celler og livsprocesserne. Til og við síðu 59** | Dagsins tema |
| | Kap. 3. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget.<br>Kap 2 í hinari útgávuni | Bókmentalisti |

| 37 | Hósdagur 16. sept | Dag og dato |
|---|---|---|
| 3 | **Celler og livsprocesserne. Síður 60 -77** | Dagsins tema |
| | Kap. 3. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget.<br>Kap 2 í hinari útgávuni | Bókmentalisti |

| 38 | Hósdagur 23. sept | Dag og dato |
|---|---|---|
| 4 | **Økologi** | Dagsins tema |
| | Kap. 4. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget.<br>Kap 3 í hinari útgávuni | Bókmentalisti |

| 39 | Hósdagur 30. sept | Dag og dato |
|---|---|---|
| 5 | **Evolution** | Dagsins tema |
| | Kap. 11. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget. Kap 10 í hinari útgávuni | Bókmentalisti |

| 40 | Evnisvika – Granskingargrundað undirvísing | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | Mánadag | Týsdag | Mikudag | Hósdag | Fríggjadag |
| Serlig skrá | | | | | |

| 41 | Heyststeðgur |
|---|---|

| 42 | Hósdagur 21. okt | Dag og dato |
|---|---|---|
| 6 | **Sopp og Planter** | Dagsins tema |
| | Kap. 12 og 13. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget. Kap 11 og 12 í hinari útgávuni | Bókmentalisti |

| 43 | Hósdagur 28. okt | Dag og dato |
|---|---|---|
| 1 | **Dyr. Til og við leddyr** | Dagsins tema |
| | Kap. 14. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget. Kap 13 í hinari útgávuni | Bókmentalisti |

| 44 | Hósdagur 4. nov | Dag og dato |
|---|---|---|
| 1 | **Dyr. Til og við pattedyr** | Dagsins tema |
| | Kap. 14. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget. Kap 13 í hinari útgávuni | Bókmentalisti |

| 45 | Hósdagur 11. nov | Dag og dato |
|---|---|---|
| 2 | **Undervisning for bærekraftig udviklimg** | Dagsins tema |
| | Kap. 16. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget. Kap 15 í hinari útgávuni | Bókmentalisti |

| 46 | Hósdagur 18. nov | Dag og dato |
|---|---|---|
| 3 | **Seksualitet og reproduksjon** | Dagsins tema |
| | Kap. 17. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget. Kap 16 í hinari útgávuni | Bókmentalisti |

| 47 | Hósdagur 25. nov | Dag og dato |
|---|---|---|
| 4 | **Fordøjelse og ekskresjon** | Dagsins tema |
| | Kap. 18. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget. Kap 17 í hinari útgávuni | Bókmentalisti |

| 48 | Hósdagur 2. des | Dag og dato |
|---|---|---|
| 5 | **Nerver og sanser** | Dagsins tema |
| | Kap. 19. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget. **(Ikki gjøgnumginið)** | Bókmentalisti |

| 49 | Hósdagur 9. des | Dag og dato |
|---|---|---|
| 6 | **Skellet og muskler** | Dagsins tema |
| | Kap. 20. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget.<br><br>**(Ikki gjøgnumgingið)** | Bókmentalisti |

| 44 | Hósdagur 16. des | Dag og dato |
|---|---|---|
| 8 | **Sirkulasjonssystemet.**<br>**Blodåresystemet, lymfesystemet og lungerne** | Dagsins tema |
| | Kap. 21. Per Ivar Kvammen, Sigmund Lie, Gunnar Christian Nyhus, Trond Vidar Vedum og Torbjørn Ødegaard (2. Útgáva 2017): Oppdag naturen – Biologi for lærere. Grunnskolelærerutdanning. Fagbokforlaget.<br><br>**(Kap 20 í hinari útgávuni)** | Bókmentalisti |

# Starvslæruhandbók

## Føroyskt & Undirvísing og læring II.

Lærarlesandi í 1.flokki

Námsvísindadeildin – várið 2022

## Starvslæran hjá 1. L – føroyskt og Undirvísing og læring II

Fyrst av øllum takka vit fyri, at tit eru sinnað at hava starvslesandi várið 2022.
Tey, sum koma á tykkara skúla, eru 1. árs lesandi, sum hava føroyskt á grundstøði og undirvísing og læring II.

Í hesum skrivinum verður kunnað um:


- **Endamálið við starvslæruni** á síðu 3
- **Loggbók** á síðu 3
- **Starvlærutíðarskeiðið** á síðu 4
- **Uppgávuna hjá starvsláraranum** á síðu 4
- **Starvslæruvitjanina** á síðu 4
- **Eftirmetingina** á síðu 5
- Vegleiðingarskriv til **miðvegissamrøðuna** á s. 6,
- Vegleiðing til **samsýningina** á s. 7,
- **Eftirmetingarfrymil** á síðu 8.


PDF-skjal til samsýningina verður sent fyri seg. Tað skal skrivast út og fyllast út við hond. Eitt skjal skal fyllast út fyri hvønn lesandi.

Samsýningin verður goldin, tá ið eftirmetingarskjalið saman við lønarseðlinum eru komin inn.

Um tit hava spurningar í samband við starvslæruna, eru tit vælkomin at seta tykkum í samband við:
*føroyskt: Rakul Skaale Andreassen,*

*Undirvísing og Læring: Rúna í Skála, runais@setur.fo, tlf. 299413*

## Endamálið við starvslæruni

Endamálið við fyrstu starvslæruni er, at tey lesandi skulu hugsavna seg um, hvussu tey skulu undirvísa einum flokki í ávísari lærugrein *(t.e. fakdidaktikkur).* Endamálið er somuleiðis, at tey lesandi skulu gerast tilvitað um, hvat tað er at vera lærari í dagsins samfelagi, og hvussu tey sjálvi roynast sum lærarar, sum nú er *(t.e. almennur didaktikkur).*

Akkersfólkini á Námsvísindadeildini hava greitt teimum lesandi frá, at endamálið við fyrstu starvslæruni er fimmbýtt:

- Tann lesandi skal fáa eina ábending um, hvat eyðkennir skúlan sum starvsøki og arbeiðspláss. Harumframt skal tann lesandi fáa greiða fatan av fjøltáttaðu uppgávunum, ið ein lærari skal loysa ígjøgnum dagin.

- Tann lesandi skal fáa kunnleika um, (1) hvussu undirvísing verður løgd til rættis, (2) hvussu undirvísing verður framd í verki, (3) hvussu undirvísing verður eftirmett, og (4) hvussu undirvísingartilgongdir og undirvísingarúrslit verða skjalfest.

- Tann lesandi skal menna sín førleika at meta um persónligu-, sosialu-, og fakligu fortreytirnar hjá teimum næmingum, ið hann skal vara av og undirvísa.

- Tann lesandi skal gerast tilvitaður um, hvussu ein knýtir bond bæði til flokkin og tann einstaka næmingin.

- Tann lesandi skal læra at grunda og meta um egnu læraraatferð.

## Loggbók

Tey lesandi skriva loggbók, har fyrireikingarnar, eygleiðingar, starvslærutíðin, samstarv o.a. verða skjalfest.

**Starvslærutíð**

Tey lesandi koma í starvslæru í viku 09 - 11, har tey hava rætt til:

- 2 tímar vegleiðing um vikuna.
- 10 tímar starvslæru um vikuna.
- at lærarin á NÁD kemur á vitjan miðskeiðis í starvslæruni.

Frammanundan starvslæruni eygleiða tey lesandi starvslæruflokkin í føroyskum og støddfrøði tveir tímar í hvørjari lærugrein.

**Uppgávan hjá starvslæruvegleiðaranum**

Í samband við starvslæruna er uppgávan hjá starvslæraranum:

- at samstarva við tey lesandi um ta fakligu og didaktisku verkætlanina.
- at taka ímóti teimum lesandi og at vísa teimum til rættis á stovninum.
- at eygleiða tey lesandi.
- í felag við tey lesandi - at hava fakligt og ástøðiligt vegleiðandi kjak í mun til praksis í starvslæruni.
- at hava ein vegleiðandi leiklut í eftirmetingini hjá teimum lesandi.
- at eftimeta tey lesandi og grundgeva metingina.

Um ikki annað er avtalað, so er uppgávan hjá starvslæraranum at leggja til rættis teir 10 undirvísingartímarnar umframt eygleiðingartímarnar saman við lesandi.

Starvslærarin og tey lesandi gera sjálv av, nær vegleiðaratímarnir verða lisnir. Báðir partar hava ábyrgdina av, at innihaldið í vegleiðaratímunum er á einum fakligum støði.

### Starvslæruvitjan

Miðskeiðis í starvslæruni kemur ein lærari frá NÁD út á stovnin at vitja tann lesandi. Endamálið við vitjanini er at eygleiða tey lesandi saman við børnunum í 45 min. Síðani tosa tey lesandi, starvslærarin og avvarðandi lærari á Námsvísindadeildini um, hvussu starvslæran hevur gingist. Hetta prátið skal telja sum ein partur av vegleiðaratímunum.

Samrøðan tekur støði í fakligum práti um, hvussu gongur við starvslæruni, hvørjar royndir tey lesandi hava gjørt sær, og hvør ætlanin er fyri næstu vikuna. Eisini er høvi at seta spurningar viðvíkjandi starvslæruni. ECTS-skeiðslýsingin kann hjálpa til at fyrihalda seg til endamálið við skeiðnum og starvslæruni.

Tað er týdningarmikið, at tey lesandi føra orðið hendan dagin, og at vit fáa eitt opið prát um, hvat hevur roynst væl, og hvat hevur roynst minni væl. Og hví so man vera?

## Eftirmeting

Tá ið starvslæran er lokin, verður starvslærarin biðin um at fylla út eitt eftirmetingarskjal, ið sigur frá, hvussu starvslæruskeiðið hevur gingist, og hvussu tann einstaki hevur staðið seg í starvslæruskeiðnum.

Námsvísindadeildin hevur gjørt eitt eftirmetingarskjal til endamálið, sum er á síðu 8.

<u>Gevið gætur</u>: Um starvslærarin ivast í, um tann starvslesandi er egnaður sum lærari, eigur hann at gera vart við hetta!

Eftirmetingarskjalið skal sendast til Námsvísindadeildina í seinasta lagi 14 dagar eftir at starvslæran er lokin.

# Miðvegissamrøðan
## - tekur støði í loggbókini -

| YVIRSKRIFTIR | TILSTUÐLANDI SPURNINGAR KUNNU VERA: |
|---|---|
| **Starvslærutilgongdin** | • Hvat er endamálið við starvslæruni?<br>• Hvussu grundgeva tit fyri hesum endamáli?<br>• Hvussu skipaðu tit starvslæruna fyri at náa endamálinum?<br>• Og hvussu meta tit, at tað hevur gingist? |
| **Uppmøting** | • Hvussu hevur uppmøtingin verið? |
| **Fyrireiking** | • Hvussu fyrireika tit tykkum, áðrenn tit møta til arbeiðis?<br>• Eru nakrar ávísar mannagongdir at fyrihalda seg til?<br>• Hava tit fyrireikað tykkum einsæris ella í toymi? |
| **Menningarmøguleikarnir hjá næmingunum** | • Hvussu hava tit borið tykkum at fyri at finna menningarfyritreytirnar hjá teimum, ið tit arbeiða við? |
| **Sambandið millum starvslesandi og flokk?** | • Hava tit megnað at fingið eitt gott huglag í flokkinum?<br>• Hvat hava tit gjørt fyri at fremja gott huglag?<br>• Hvussu gongur tað at samskifta, práta og vegleiða næmingunum? |
| **Toymissamstarvið ímillum tey lesandi** | • Hvussu hevur toymissamarbeiðið eydnast? *(Hvør hevur gjørt hvat? Og hvør hevur gjørt av, hvat skal gerast?)*<br>• Hvørjar eru tær størstu avbjóðingarnar, tá ið ein skal samstarva í toymi? |
| **Starvið sum lærari** | • Hvussu hóvar tær lærarayrkið, sum nú er?<br>• Hvørjar vóru størstu avbjóðingarnar fyrstu vikuna?<br>• Eru arbeiðsuppgávur, ið tit ikki vistu vóru partar av lærarastarvinum? |
| **Meting av atferð** | • Til tann einstaka lesandi: Hvussu metir tú sjálv/ur, at tú hevur roynst í starvslæruni fyrstu vikuna?<br>• Hvørjar eru tínar dygdir, og hvørjir eru tínir veikleikar?<br>• Tá ið tú metir um tína atferð, hvørji øki kundi tú hugsað tær at hugsavnað teg um og arbeitt við í framtíðini? |
| **Samstarvið við starvslæraran** | • Hvussu hava tit samstarvað við starvslæraran?<br>• Hvørji evni hava tit tosað um í vegleiðaratímunum?<br>• Annað. |

# SAMSÝNING

| Starvslæruskeiðið | Vika |
|---|---|
| **Tímatal um vikuna** | Læraralesandi eru í starvslæru í 10 tímar um vikuna í 3 vikur, umframt 2 vegleiðaratímar um vikuna. |
| | Ein starvslærutími og vegleiðaratímar eru á 60 min. |
| **Samsýning** | Starvslærarin fær kr. 113,09 um tíman fyri hvønn læraralesand í starvslærutíðini. Harumframt fær hann kr. 205,61 fyri hvønn vegleiðaratíma. Skúlaleiðarin fær kr. 6,17 fyri hvønn lisnan tíma.<br><br>Starvslærarin verður biðin um at senda Námsvísindadeildini ein lønarseðil (hjálagt skjal) ið vísir, hvussu nógvar starvslærutímar og hvussu nógvar vegleiðaratímar hann hevur nýtt hetta skeiðið. Ein lønarseðil pr. lesandi.<br><br>Starvslærarin skal skriva navn, p-tal og kontunr. og eftirlønarkonto á listan. |
| **Eftirmeting** | Tað er **sera umráðandi,** at navnið á tí lesandi er á skjølunum. Eftirmetingarskjalið skal sendast til nad@setur.fo<br>Starvslærarin skal lata Námsvísindadeildini eftirmetingarskjalið aftur í seinasta lagi 2 vikur, eftir at starvslæran er liðug.<br><br>Bústaður: **Námsvísindadeildin, Postrúm 348, 100 Tórshavn** |

## Eftirmetingarfrymil – ætlaður starvslæraranum **verður sent til nad@setur.fo**

| | |
|---|---|
| **Navn á lesandi:** | |
| **Vegleiðari:** | |
| **Starvslærupláss** | |
| **Flokkur/flokkar** | |
| **Tíðarskeið** | |

| YVIRSKRIFT | VIÐMERKINGAR FRÁ STARVSLÆRARANUM |
|---|---|
| **AT LEGGJA TIL RÆTTIS:**<br>(Hvussu hevur tann lesandi megnað at lagt undirvísingina til rættis?) | |
| **LÆRUFORTREYTIR:**<br>(Hvussu hevur tann lesandi megnað at lagað undirvísingina til floksstigið og til búningarstigið hjá tí einstaka næminginum?) | |
| **SAMSKIFTI:**<br>(Hvussu hevur tann lesandi megnað at samskift og knýtt bond við flokkin og tann einstaka næmingin? | |
| **SAMSTARVSEVNI:**<br>(Hvussu hevur samstarvið verið millum starvsnæmingarnar í starvslærutíðini? Og hvussu hevur samstarvið verið millum teg sum starvslærara og tann lesandi?) | |
| **LÆRARAATFERÐ:**<br>(Hvat eyðkennir læraraatferðina hjá tí lesandi? Eru tað t.d. øki, ið tann lesandi skal vera tilvitað/ur um og royna at styrkja komandi árið? | |
| **AÐRAR VIÐMERKINGAR:** | |

# STARVSLÆRUHANDBÓKIN

*Søga*

*2021/2022*

SØGA SUM DØMI – ALLAR STARVSLÆRUBHANDBØKURNAR HAVA SAMA BYGNAÐ

Námsvísindadeildin

Fróðskaparsetur Føroya

Tórshavn 13/1-2022

Góða skúlaleiðsla og góðu starvslæruvegleiðarar

Fyrst av øllum vilja vit takka fyri, at tit eru sinnað at taka læraralesandi á Námsvísindadeildini í starvslæru á vári 2022.

Tey, ið koma í starvslæru hesa ferð, ganga í 2. 3. og 4. árgangi.

Í hesum skrivinum verður kunnað um:

- Endamálið við søgulinjuni
- Hvat hendir, áðrenn starvslæran byrjar
- Nær tey lesandi koma í starvslæru
- Uppgávuna hjá starvslæruvegleiðaranum
- Hvørji evni lesandi og starvslæruvegleiðarin skulu skifta orð um í ráðleggingartímunum
- Miðvegissamrøðuna
- Eftirmetingarskjalið
- Samsýningina til skúlastjórar og starvslærarar fyri at hava lesandi í starvslæru
- Lønarseðilin er viðheftur

Gevið gætur: **Lønarseðilin verður sendur tykkum sum elektroniskt skjal. Tit skulu útfylla skjalið og senda tað við telduposti til** nad-starvslaran@setur.fo**. Hetta skal gerast í seinasta lagi 14 dagar eftir starvslæruna.**

**Skúlin skal senda ein lønarseðil pr. lesandi.**

Tey lesandi skulu seta seg í samband við starvslæruvegleiðaran á skúlanum.

## HVAT ER ENDAMÁLIÐ VIÐ STARVSLÆRUSKEIÐNUM?

Starvslæran er partur av søgulinjuni. Endamálið og læruúrtøkurnar fyri skeiðið eru:

| | |
|---|---|
| **Akkerslærari** | Oddur á Lakjuni, oddurL@setur.fo, tlf 594344 |
| **Heiti**<br>*Title* | Søga – starvslæra<br><br>*History – Field experience* |
| **ECTS**<br>*ECTS* | 10 |
| **Endamál**<br>*Purpose* | Endamálið við starvslæruni er, at tann lesandi skal fáa royndir at undirvísa næmingum í fólkaskúlanum í søgu |
| **Læruúrtøka**<br>*Learning outcomes* | Við skeiðslok skal tann lesandi megna<br><br>• at greiða frá, hvat næmingarnir skulu læra í søgu í fólkasakúlanum.<br>• at leggja eina undirvísingarætlan til rættis, ið fevnir um millum 4 og 10 undirvísingartímar<br>• at meta um, hvat undirvísingartilfar er vælegnað í søgu í fólkaskúlanum.<br>• at taka støðu til, hvørjir undirvísingarhættir eru vælegnaðir í søgu í fólkaskúlanum.<br>• at meta um, hvussu ein kann næmingalaga undirvísingina í søgu.<br>• at hugleiða um og at vísa við dømum, hvørjar avbjóðingar ein lærari, ið undirvísir í søgu í fólkaskúlanum, kann renna seg í<br>• at eftirmeta starvslæruskeiðið |

## HVAT HENDIR, ÁÐRENN STARVSLÆRAN BYRJAR?

Tey lesandi skulu seta seg í samband við starvslæruvegleiðaran í seinasta lagi ein mánaða, áðrenn starvslæran byrjar. Her skulu tey gera avtalur um, hvat er møguligt at gera í undirvísingini í starvslærutíðini.

## NÆR KOMA TEY LESANDI Í STARVSLÆRU?

Starvslæruskeiðið fyri lesandi í 2. L og 3. L byrjar í viku 6 (t.e. mánadagin 7/2-2022) og endar í viku 10 (t.e. fríggjadagin 11/3-2022).

Starvslæran fevnir um

- 10 undirvísingartímar pr. viku
- 2 vegleiðingartímar pr. viku

Starvslæruskeiðið fyri lesandi í 4. L byrjar í viku 6 (t.e. mánadagin 7/2-2022) og endar í viku 8 (t.e. fríggjadagin 25/2-2022).

Starvslæran fevnir um

- 16 undirvísingartímar pr. viku
- 2 vegleiðingartímar pr. viku

## HVØR ER UPPGÁVAN HJÁ STARVSLÆRUVEGLEIÐARANUM?

Í sambandi við starvslæruna er uppgávan hjá starvslæruvegleiðaranum

- at kunna tey lesandi um tann flokk og/ella teir flokkar, sum tey skulu undirvísa
- at kunna tey lesandi um tey evni og tað tilfar, ið næmingarnir hava arbeitt við gjøgnum skúlaárið
- at taka ímóti teimum lesandi og at vísa teimum runt á skúlanum
- at eygleiða og leiðbeina teimum lesandi gjøgnum starvslæruskeiðið
- at seta tíð av til vegleiðingartímar og at tryggja, at hesir tímar snúgva seg um viðkomandi faklig og fak- og almen didaktisk evni

## HVØRJI EVNI SKULU TANN LESANDI OG STARVSLÆRUVEGLEIÐARIN SKIFTA ORÐ UM Í RÁÐLEGGINGARTÍMUNUM?

Her eru nøkur evni, sum eru viðkomandi at taka upp í samrøðuni:

**Lærararaleikluturin.**

- Hvat metir tann lesandi, at hann megnar væl og hvørjar uppgávur eru meiri torførar í starvinum?

**Fyrireiking**

- Hvussu væl eru tit fyrireikað, tá ið tit møta til tíma? *(Hava tit t.d. havt nógv mikið av tilfari við tykkum?)*
- Hvussu nógva tíð nýta tit at fyrireika tykkum?
- Hvørjar mannagongdir hava tit nýtt, tá ið tit hava brynjað tykkum til tíma?
- Hava tit fyrireikað tykkum einsæris ella í toymi?

**Lærufortreytirnar hjá næmingunum**

- Hvussu hava tit borið tykkum at fyri at finna lærufortreytirnar hjá teimum næmingum, ið tit undirvísa?
- Hvussu hevur tað gingist tykkum at sundurbýta og næmingalaga undirvísingina?

**Samband ímillum tann lesandi og flokkin**

- Hava tit megnað at skapa eitt gott huglag í flokkinum?
- Hvat hava tit gjørt á hesum øki?
- Hvussu gongur tað at samskifta, práta og vegleiða bæði flokkinum og einstaka næminginum? *(Eru ávísir næmingar léttari at samskifta við enn aðrir?)*

## HVUSSU SKAL MIÐVEGISSAMRØÐAN SKIPAST?

Miðvegis í starvslæruni kemur undirvísarin av NáD út at eygleiða, ímeðan tey lesandi undirvísa ein tíma. Beint eftir eygleiðingina skal ein miðvegissamrøða vera ímillum tey lesandi, starvslæruvegleiðaran og undirvísaran av NáD. Til ber at brúka hesar spurningar sum hjálp í samrøðuni.

| YVIRSKRIFTIR | TILSTUÐLANDI SPURNINGAR KUNNU VERA: |
|---|---|
| **Starvslærutilgongdin** | • Hvat er endamálið við starvslæruni?<br>• Hvussu grundgeva tit fyri hesum endamáli?<br>• Hvussu skipaðu tit starvslæruna fyri at náa endamálinum?<br>• Og hvussu meta tit, at tað hevur gingist? |
| **Uppmøting** | • Hvussu hevur uppmøtingin verið? |
| **Fyrireiking** | • Hvussu fyrireika tit tykkum, áðrenn tit møta til arbeiðis?<br>• Eru nakrar ávísar mannagongdir at fyrihalda seg til?<br>• Hava tit fyrireikað tykkum einsæris ella í toymi? |
| **Menningarmøguleikarnir hjá næmingunum** | • Hvussu hava tit borið tykkum at fyri at finna menningarfyritreytirnar hjá teimum, ið tit arbeiða við? |
| **Sambandið millum starvslesandi og flokk?** | • Hava tit megnað at fingið eitt gott huglag í flokkinum?<br>• Hvat hava tit gjørt fyri at fremja gott huglag?<br>• Hvussu gongur tað at samskifta, práta og vegleiða næmingunum? |
| **Toymissamstarvið ímillum tey lesandi** | • Hvussu hevur toymissamarbeiðið eydnast? *(Hvør hevur gjørt hvat? Og hvør hevur gjørt av, hvat skal gerast?)*<br>• Hvørjar eru tær størstu avbjóðingarnar, tá ið ein skal samstarva í toymi? |
| **Starvið sum lærari** | • Hvussu hóvar tær lærarayrkið, sum nú er?<br>• Hvørjar vóru størstu avbjóðingarnar fyrstu vikuna?<br>• Eru arbeiðsuppgávur, ið tit ikki vistu vóru partar av lærarastarvinum? |
| **Meting av atferð** | • Til tann einstaka lesandi: Hvussu metir tú sjálv/ur, at tú hevur roynst í starvslæruni fyrstu vikuna?<br>• Hvørjar eru tínar dygdir, og hvørjir eru tínir veikleikar?<br>• Tá ið tú metir um tína atferð, hvørji øki kundi tú hugsað tær at hugsavnað teg um og arbeitt við í framtíðini? |
| **Samstarvið við starvslæraran** | • Hvussu hava tit samstarvað við starvslæraran?<br>• Hvørji evni hava tit tosað um í vegleiðaratímunum?<br>• Annað. |

## HVUSSU VERÐUR STARVSLÆRAN EFTIRMETT?

Tá ið starvslæran er lokin, skal starvslæruvegleiðarin fylla út eitt eftirmetingarblað. Í eftirmetingarblaðnum skal vegleiðarin meta um undirvísingarførleikarnar hjá tí lesandi og seta orð á

- hvat gekk væl
- hvat gekk minni væl
- hvat eigur tann lesandi at hefta seg við og/ella arbeiða við tað, ið er eftir av lestrartíðini.

Tað er týdningarmikið, at starvslæruvegleiðarin ger sær ómak, tá ið hann útfyllir eftirmetingarblaðið, tí at fáa konstruktivar viðmerkingar frá einum royndum fólkaskúlalærara hevur stórt virði í læraralestrinum.

Gevið gætur: Hóast lesandi kunnu fara í starvslæru í bólki, so skulu tey eftirmetast hvør sær. T.e. at starvslæruvegleiðarin skal útfylla *eitt eftirmetingarblað pr. lesandi*.

Fyri at leiða starvslæruvegleiðarar kring landið inn á somu slóð, so hevur leiðslan á Námsvísindadeildini gjørt av, at orðað eitt standardiserað eftirmetingarblað (sí niðanfyri).

## Eftirmetingarfrymil – ætlaður starvslæraranum

| | |
|---|---|
| **Navn á lesandi:** | |
| **Akkersfólk á NáD** | Oddur á Lakjuni, oddurL@setur.fo, tlf 594344 |
| **Starvslæruvegleiðari:** | |
| **Skúli:** | |
| **Flokkur og lærugrein:** | |
| **Tíðarskeið:** | |
| **YVIRSKRIFT** | **VIÐMERKINGAR FRÁ STARVSLÆRARANUM** |
| **AT LEGGJA TIL RÆTTIS:** Hvussu hevur tann lesandi megnað at lagt undirvísingina til rættis? | |
| **LÆRUFORTREYTIR:** Hvussu hevur tann lesandi megnað at lagað undirvísingina til floksstigið og til búningarstigið hjá tí einstaka næminginum? | |
| **SAMSKIFTI:** Hvussu hevur tann lesandi megnað at samskift og knýtt bond við flokkin og tann einstaka næmingin? | |
| **SAMSTARVSEVNI:** Hvussu hevur samstarvið verið millum starvsnæmingarnar í starvslærutíðini? Og hvussu hevur samstarvið verið millum teg sum starvslærara og tann lesandi?) | |
| **LÆRARAATFERÐ:** Hvat eyðkennir læraraatferðina hjá tí lesandi? Eru tað t.d. øki, ið tann lesandi skal vera tilvitað/ur um og royna at styrkja komandi árið? | |
| **AÐRAR VIÐMERKINGR:** | |

Gevið gætur: Um starvslæruvegleiðarin ivast í, um tann lesandi kann standa starvslæruna, so eigur hann at seta seg í samband við akkersfólkið á Námsvísindadeildini skjótast til ber. Samrøðan millum starvslæruvegleiðaran og akkersfólkið á NÁD er í trúnaði.

## HVAT SKALT TÚ GERA VIÐ EFTIRMETINGARBLAÐIÐ?

Starvslæruvegleiðarin skal útfylla eftirmetingarblaðið áðrenn seinasta vegleiðingartíma, og hann skal gjøgnumganga eftirmetingarblaðið saman við tí lesandi, áðrenn tann lesandi fer av skúlanum.

Starvslæruvegleiðarin skal greiða frá sínum

- eygleiðingum
- viðmerkingum
- tilmælum/góðu ráðum

**Skjótast møguligt og í seinasta lagi 7 dagar eftir at starvslæran er endað, skal starvslæruvegleiðarin senda eftirmetingarblaðið** sum PDF til nad-starvslaran@setur.fo og telduposturin skal vera bronglaður.

*Gev gætur*: Tað er sera umráðandi, at (1) navn og eftirnavn á tí lesandi, (2) navn og eftirnavn á starvslæruvegleiðaranum og (3) navn (tlf. & teldupostadr) á skúla standa á skjalinum.

## HVØRJA SAMSÝNING FÁA SKÚLASTJÓRAR OG STARVSLÆRUVEGLEIÐARAR FYRI AT HAVA LESANDI Í STARVSLÆRU?

Hesir eru takstirnir:

- Starvslæruvegleiðarin fær 116,85 kr,- fyri hvønn undirvísingartíma
  - Eru 2 lesandi í bólki, so verður upphæddin tvífaldað
  - Eru 3 lesandi í bólki, so verður upphæddin trífaldað

- Starvslæruvegleiðarin fær 212,45 kr,- fyri hvønn ráðleggingartíma
  - Upphæddin er tann sama, líkamikið um lesandi eru í bólki ella einsæris

- Skúlaleiðslan fær 6,37 kr,- fyri hvønn starvslærutíma og hvønn ráðleggingartíma pr. lesandi.

# Lønarseðil fyri starvslæruna hjá læraralesandi 2021/2022

| | |
|---|---|
| Í tíðini: | / til / -2022 (vika ) hevur: |
| Lesandi: | |
| Luttikið í hesum: _____________ undirvísingartímum og ___________ vegleiðingartímum | |
| Lærugrein/skeið: | Søga |
| Akkersfólk á NÁD: | Oddur á Lakjuni, oddurL@setur.fo, tlf 594344 |
| Skúli: | |
| Teldupostur/tlf: | |
| Skúlaleiðari: | |
| P-tal: | |
| Kontonr. og banki: | |
| Eftirlønarkonto: | Betri: ☐ Lív: ☐ Annað: |

** Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag fær skúlaleiðarin kr. 6,37 fyri hvønn lisnan tíma.*

| | |
|---|---|
| Starvslæruvegleiðari: | |
| P-tal: | |
| Kontonr.: | |
| Eftirlønarkonto: | |

** Sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag verður starvslæran samsýnd soleiðis:*
*Undirvísingartímar: Tímaløn á stigi 29.2 falda við 0,55 fyri hvønn praktikktíma fyri hvønn lesandi (kr. 116,85) og*
*Samtalutímar: Tímaløn á stigi 29.2 falda við 1,00 fyri hvønn bólk (kr. 212,45)*

_______________________________
*Dagfesting og undirskrift (leiðari)*

***Gevið gætur***: Skúlin skal senda eitt eftirmetingarblað pr. lesandi, saman við hesum skjalinum. Eftirmetingarblaðið og samsýningarskjalið skulu sendast til nad-starvslaran@setur.fo í SEINASTA lagi 14 dagar eftir, at starvslæran er lokin.

# Námsskipan

## fyri lærararaútbúgvingina á Námsvísindadeildini

2016-2021

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

*) Bíðað verður eftir at nýggj kunngerð verður lýst. Tá kunngerðin er lýst, væntandi í 2019/20 verður henda námsskipanin sameind við nýggjari námsskipan, sum tekur atlit til nýggju ásetingarnar í kunngerðini. Hetta kann hava broytingar við sær fyri eftirfylgjandi árini í námsskipanini.

August 2016 – Seinast dagførd 09. desember 2019

# Fororð

Ein námsskipan inniheldur grundreglurnar fyri lestrinum. Saman við skeiðslýsingum og yvirskipaðum reglum hjá Setrinum er námsskipanin eitt týðandi amboð, sum kunnar um rættindi og skyldur teirra lesandi.

Sambært viðtøkunum skal Lestrarráðið fáa uppskot til útbúgvingarprofilar og námsskipanir til viðgerðar og góðkenningar frá útbúgvingarleiðara, eftir at útbúgvingarleiðarin hevur fingið svar frá hoyringspørtum. Tá ið uppskot til námsskipan hevur verið viðgjørt, og vissa er fingin fyri, at viðkomandi partar eru hoyrdir, góðkennir lestrarráðið námsskipanina og letur dekaninum hana til víðari avgreiðslu.

Lestrarráðið hevur eftirlit við, at ymisku partarnir av útbúgvingini hanga saman, og at einstøk fak ella fakøki ikki broytast ov nógv í mun til endamálið við útbúgvingini. Ráðið skal eisini tryggja, at veitta undirvísingin og próvtøkukrøvini hóska til endamálið við útbúgvingini.

Henda námsskipanin er góðkend á Lestrarráðsfundi xx. xxx 2019.

# Inngangur

Í hesum skjali er námsskipanin fyri bachelorútbúgvingina til fólkaskúlalærara lýst. Námsskipanin fyri útbúgvingina til fólkaskúlalærara er gjørd við hesum lógargrundarlagi:

- Løgtingslóg nr. 58 frá 9. juni 2008 um Fróðskapasetur Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 51 frá 8. mai 2012
- Kunngerð nr. 140 frá 13. nov. 2009 um útbúgving av fólkaskúlalærarum og námsfrøðingum
- Kunngerð nr. 85 frá 9. juni 2009 um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 og reglur um alment próvskeið í føroyskum
- Kunngerð nr. 111 frá 31. august 2011 um broyting í kunngerð um skiftisreglur fyri lesandi á Fróðskaparsetri Føroya, sum byrjað hava lesturin áðrenn 1. august 2008 og reglur um alment próvskeið í føroyskum
- Kunngerð um próvtalsstiga og døming, nr. 73, 31.mai 2013

Námsskipanin sigur, hvørji krøv verða sett tí lesandi, og hvørji rættindi og skyldur hann hevur sum lesandi á Námsvísindadeildini/Fróðskaparsetri Føroya.

Námsskipanin er galdandi ta tíð, lesturin er ásettur at vera. Um tann lesandi vegna longda lestrartíð kemur í ta støðu, at nýggj námsskipan kemur í gildi, áðrenn hann hevur staðið allar próvtøkurnar, má hann gera avtalu við fyrisitingina (deildarskrivstovu/útbúgvingarleiðara) um, hvussu lesturin verður fullførdur.

Størri broytingar í námsskipanum koma í gildi við lestrarársbyrjan.

Námsskipanin inniheldur ikki skeiðslýsingar fyri tey einstøku fakini og heldur ikki almennar reglur hjá Setrinum. Hesar eru at finna á heimasíðu Setursins.

Námsskipanin fyri læraraútbúgvingina á Námsvísindadeildini er ábyrgdarøki hjá Lestrarráðnum á Námsvísindadeildini. Útbúgvingarleiðarin hevur fakligu ábyrgdina og leggur útbúgvingina til rættis.

Tórshavn, xx. des. 2019

Lydia Didriksen, útbúgvingarleiðari

# 1 Lýsing av útbúgvingini

## 1.1 Endamál

Endamálið er at útbúgva fólkaskúlalærarar, sum eru førir fyri at samstarva um heildarmenning av menniskjanum. Útbúgvingin er granskingargrundað og á slíkum støði, at hon verður viðurkend í grannalondunum, bæði yrkisrættað og sum grundstøði undir framhaldslestri.

Í útbúgvingini skulu lesandi menna ein fak- og almenndidaktiskan førleika, sum, saman við fakligum kunnleika, gevur teimum førleika at skipa fyri undirvísing á høgum stigi í fólkaskúlanum.

Útbúgvingin tekur 4 ár og er skipað sum ein 4-ára bachelorútbúgving, ið gevur rætt til heitið baccalaurius educationes, stytt B.Ed., og telur 240 ECTS. Føroyska heitið er *B.Ed. sum fólkaskúlalærari*. Enska heitið Bachelor of Education (B.Ed.) in Primary and Lower Secondary Education.

## 1.2 profilur av útbúgvingini

| |
|---|
| Fólkaskúlalærari (B.Ed.) – Bachelor of Education (B.Ed.) in Primary and Lower Secondary Education |

| | |
|---|---|
| Slag av útbúgving og áramál | Læraraútbúgvingin er skipað sum ein B.Ed.-útbúgving, ið telur 240 ECTS námsstig (4 lestrarár). |
| Útbúgvingarstovnur/-ar | Námsvísindadeildin, Fróðskaparsetur Føroya (Department of Education, University of the Faroe Islands. |
| Stovnur, ið góðkennir útbúgvingar | Mentamálaráðið – stuttstavað MMR |
| Tíðarbil, víst verður til | Námsskipan fyri læraraútbúgvingina er galdandi frá august 2016 |
| Stig | B.Ed. stig |

| | |
|---|---|
| a | Endamál |
| | Endamálið er at útbúgva fólkaskúlalærarar, sum eru førir fyri at fyrireika, fremja, eftirmeta, skjalprógva og menna undirvísingargongdir í ymsu lærugreinunum á grunddeild, miðdeild og hádeild í fólkaskúlanum. |

| | |
|---|---|
| | Ein útbúgvin lærari skal somuleiðis vera førur fyri at grunda yvir, kanna og meta um námsvísindaligar meginspurningar í síni heild. |

| b | Eyðkenni | |
|---|---|---|
| 1 | Grein(ar) / evnisøki | Læraraútbúgvingin er sett saman av trimum høvuðspørtum:<br><br>Einum almenndidaktiskum parti, ið snýr seg um sambandið millum menniskju og samfelag, útbúgving og myndan, menning og trivnað, undirvísing og læring.<br><br>Einum parti, ið er skipaður sum linjulestur.<br><br>Einum starvsrættaðum parti, ið kann lesast annaðhvørt í føroyska fólkaskúlanum ella í skúlum í øðrum londum. |
| 2 | Almennur / serligur dentur | Útbúgvingin er rættað móti fólkaskúlanum. Við útbúgvingarlok hevur tann lesandi ognað sær skjalprógvaðan førleika at undirvísa og virka á øllum floksstigum í fólkaskúlanum. |
| 3 | Kós | Undirvísingin er granskingargrundað og yrkisrættað. Granskingarøkini fevna um almenndidaktiskar og fakdidaktiskar aðalspurningar. |
| 4 | Serlig eyðkenni | Umframt at arbeiða við almenndidaktiskum evnum og fyribrigdum, ið eru viðkomandi í øllum lærugreinum og á øllum floksstigum í fólkaskúlanum, so miðsavna studentarnir seg um hesi evni:<br><br>fyrsta lestaraár: grundskeið í undirvísing og læring, føroyskum og støddfrøði<br><br>annað og triðja lestarrár: linjulestur, har lesandi nema sær fakliga, námsfrøðiliga og fakdidaktiska servitan innan ávís fakøki umframt framhaldsskeið í undirvísing og læring<br><br>fjórða lestrarár: linjulestur og framhaldsskeið í undirvísing og læring. B.Ed-verkætlanin verður skrivað í endanum á 4. lestrarári.<br><br>Í nøkrum av linjugreinunum er samlestur millum námsfrøðinga- og læraralesandi.<br><br>Tey lesandi fáa B.Ed.-prógv í undirvísing ( 1. – 10. flokk) eftir fýra lestrarár (t.e. 240 námsstig). |

| C | Starvsmøguleikar og framhaldsútbúgving | |
|---|---|---|
| 1 | Starvsmøguleikar | Tey, ið hava lokið lærarprógv hava skjalprógvaðan førleika at verða sett í starv í føroyska fólkaskúlanum og í fólkaskúlum í Norðurlondum. |
| 2 | Framhaldsútbúgving | Tey, ið hava lokið lærarprógv, hava skjalprógvaðan førleika at fara undir framhaldslestur á hægri lærustovnum, ið hava námsfrøði og atknýtt granskingarøki sum serfrøði. |

| d | Útbúgvingarháttur | |
|---|---|---|
| 1 | Arbeiðslag í sambandi við læru- og undirvísing | Undirvísingarhættirnir eru fyrilestrar, floksundirvísing, einstaklingauppgávur, einstaklingaframløgur, bólkaarbeiði, ið er skipað eftir ymiskum leistum, bólkaframløgur, evnisarbeiði, verkætlanararbeiði, verkstaðararbeiði, starvslærufrágreiðingar, lesiringar osfr. |
| 2 | Metinga- og prívtøkuhættir | Skrivligar uppgávur, munnligar framløgur, synopsur, starvslærufrágreiðingar, starvslæruviðgerðir o.a. |

| E | Útbúgvingarførleikar |
|---|---|
| 1 | Almennir førleikar |
| | Við útbúgvingarlok hevur tann lesandi ognað sær hesar førleikar:<br><br>Akademiskan førleika. T.e. førleikin at hugsa úrtøkiliga; at leita sær upplýsingar; at meta um kelduvirðið á fjølbroyttum tilfari; at greiða, greina og føra prógv, ið eru fakliga og etiskt væl grundað.<br><br>Samstarvs- og samskiftisførleika: T.e. førleikin at samstarva og samskifta um fjølbroytt evni við fjølbroyttar samskiftis- og starvsfelagar.<br><br>Virkisførleiki: T.e. førleikin at taka avgerðir og at loysa ítøkiligar uppgávur bæði einsæris og í bólki. |
| 2 | Námstreytaðir førleikar |
| | Við útbúgvingarlok hevur tann lesandi ognað sær hesar førleikar:<br><br>Førleika at greina lógar- og regluverk á skúlaøkinum: T.e. førleikin at seta seg inn í tær lógir og kunngerðir, ið eru galdandi á skúlaøkinum og at skapa eitt undirvísingartilboð, ið svarar til lógar- og kunngerðartekstin. T.e. er førleikin at skilja og kritiskt meta um tann logikk, ið undirvísing og undirvísingarligt arbeiði byggir á.<br><br>Pedagogiskan, didaktiskan og fakligan førleika: T.e. førleikin at nýta fjølbroytt námsfrøðilig, sálarfrøðilig og didaktisk ástøði og háttaløg, tá ið lesandi fyrireika, fremja og eftirmeta |

| | |
|---|---|
| | undirvísing og undirvísingarlig úrslit. Hetta inniber, at lesandi eru væl grundað fakliga og fakdidaktiskt í teimum linjum, tey hava valt.<br><br><u>Førleika at knýta sambond og at skapa trivnað:</u> T.e. innlivingarevni; at virða sjónarmiðini hjá øðrum; at duga at skapa góð og sterk sambond við menniskju, ið hava ymiskar menningarfortreytir, persónsmenskur og áhugamál.<br><br><u>Granskingarførleika</u>: T.e.førleikin at gera smærri granskingar- og menningarverkætlanir á námsfrøðiliga økinum.<br><br><u>Sjálvseftirmeting og lívslanga læru</u>: T.e. at duga at meta um sína egnu læraramedferð og støðugt at arbeiða við at menna sínar yrkisrættaðu førleikar. |

| | |
|---|---|
| F | Fullfíggjaður listi við læruúrtøkuni frá útbúgvingini |
| | Eftir lokna útbúgving, skal hin lesandi vísa, at hann megnar, at<br><br>• greiða frá og greina tær lógir og kunngerðir, ið eru galdandi á skúlaøkinum og umseta tær til undirvísingarvirksemi. *(T.e. fólkaskúlalógin, frískúlalógin, námsætlanir, forsorgarlógin, Barnarættindasáttmálin hjá ST, Salamankaviðtøkurnar o.s.fr.)*<br>• lýsa og kritiskt viðgera demokratiska og kristna siðaarvin, og hvussu hesin hevur myndað virðisgrundarlagið undir føroyska samfelagnum<br>• greiða frá og greina uppalingar- og myndanaruppgávu skúlans<br>• viðgera hvussu samfelagskarmar, harímillum lógarverk og aðrar politiskar avgerðir, ávirka lívsrúmið, -møguleikar og –góðskuna hjá menniskjum<br>• greiða frá fjølbroyttum námsfrøðiligum, sálarfrøðiligum og didaktiskum ástøði<br>• greina og kritiskt viðgera ástøði og arbeiðshættir innan undirvísing og læring<br>• lýsa og kritiskt viðgera ymisk ástøði um, hvussu menniskju búnast, mennast og læra, sæð í sálarfrøðiligum, mentanarligum og søguligum ljósi<br>• fyrireika, fremja, eftirmeta, skjalfesta og menna ítøkiligar undirvísingartilgongdir við støði í viðurkendum ástøðum og háttaløgum, og sum skapa líkindi fyri, at menniskju mennast og læra<br>• nýta viðkomandi faklig háttaløg og kunnleika í einstøku lærugreinunum<br>• skipa undirvísing soleiðis at allir næmingar fáa sínar avbjóðingar.<br>• nýta kst í undirvísingini<br>• skipa undirvísing soleiðis, at næmingarnir hava ávirkan og medábyrgd<br>• lýsa, greina og taka avgerðir um yrkisetisk viðurskifti<br>• greina og brúka granskingargrundaðan kunnleika í lærarastarvinum<br>• skipa námsfrøðiligt menningararbeiði, har ímillum at menna og greina smærri granskingarverkætlanir á skúlaøkinum<br>• meta um eins egna yrkissamleika, bæði tá hugsað verður um hugburð og arbeiðshættir og viðgera, hvussu hesin ávirkar menningar-, læru- og trivnaðarmøguleikarnar hjá teimum, ið ein varðar av<br>• vísa, hvussu ein mennir góð sambond við tey, ein varðar av, sum hava fjølbroyttar menningarfortreytir, persónsmenskur og áhugamál<br>• greiða frá grundleggjandi viðurskiftum, ið gera seg galdandi, tá gott huglag og góður trivnaður skal skapast |

| | |
|---|---|
| | • **samskifta og** samstarva við tey, ið lærarar varða av, samstarvsfelagar, foreldur, avvarandi og aðrar myndugleikar<br>• greiða frá og kritiskt viðgera fakliga innihaldið í linjufakunum, tann lesandi hevur valt<br>• viðgera sambandið ímillum undirvísingarøki og fakøki á teimum linjum, tann lesandi hevur valt<br>• menna, gjøgnumføra og meta um undirvísingargongdir í sínum linjufakum, ið byggja á viðkomandi fakøki og fakdidaktikk |

## 1.3 Støðd og próvdøming

Læraraútbúgvingin er fulltíðarlestur í fýra ár og telur 240 ECTS-stig. Útbúgvingin er skipað í skeiðum. Øll skeið hava eitt ECTS-stigatal, ið sigur frá, hvussu nógva arbeiðsorku skeiðið krevur av teimum lesandi. Hvørt lestrarár telur 60 ECTS-stig, og roknað verður við, at eitt ects svarar til 25- 30 arbeiðstímar hjá einum lesandi.

Skeiðslýsingar, við upplýsingum um støðd, próvdøming, undirvísingarhættir, próvtøkuslag, próvtalsstiga hvørt próvdømingin er innanseturs ella uttanseturs síggjast á heimasíðu Setursins.

Leinki til skeiðslýsingar hoyrandi til námsskipan 2016-2020.

# 2 Upptøkukrøv

Upptøkutreyt er gymnasial miðnámsútbúgving (kvota 1). Í serligum føri kann víkjast frá hesum kravi, um umsøkjarin á annan hátt hevur ognað sær vitan og lestrarførleika, ið kann javnsetast við gymnasiala miðnámsútbúgving (kvota 2). Fróðskaparsetur Føroya hevur møguleika til at bjóða ískoytisskeið sum lestrarfyrireiking. Fróðskaparsetur Føroya kann seta serstøk krøv um førleikar at verða tikin upp til ávísar linjur. Útbúgvingarleiðarin hevur ábyrgdina av upptøku.

## 2.1 Stakgreinalestur

Stakgreinalesandi eru lesandi, sum fylgja undirvísing og fara til próvs í einstøkum lærugreinum/skeiðum, uttan at vera innskrivað til fullan lestur.

Stakgreinalesandi søkja um upptøku til hvørt skeið sær og skulu lúka somu krøv til upptøku sum onnur lesandi.

Stakgreinalesandi kunnu verða tikin upp, um pláss er á skeiðinum.

Gjald er fyri stakgreinalestur. Skeiðsgjaldið er fyri undirvísing, vegleiðing, próvtøku og umsiting.

Søkt verður um upptøku til stakgreinalestur við serstøkum umsóknarblaði.

# 3 Reglur um fakligar samansetingar og valmøguleikar

Læraraútbúgvingin er skipað við kravdum grundskeiðum, og valfríum linjugreinum. Starvslæra er kravdur partur av bæði grundfakum og linjufakum.

Grundskeið eru kravdur partur av útbúgvingini.

Linjulestur verður lisin í lærugreinum fólkaskúlans. Eisini er møguleiki at lesa linju í skúlabúgving / innskúling, sernámsfrøði og námsfrøðiligari leiðslu.

Lærugreinirnar í fólkaskúlanum eru:

Alis-/evnafrøði, danskt, enskt, føroyskt, handarbeiði, heimkunnleika, ítrótt, kunningartøkni, kristni, landalæra, lívfrøði, myndlist, náttúru/tøkni, samfelagsfrøði, smíð, støddfrøði, søga, tónleik og týskt.

Lestrarskeiðið 2016-2020

| | | | 1. árið | | 2. árið | | 3. árið | | 4. árið | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | ects | 1. se | 2. sem | 3. sem | 4. sem | 5. sem | 6. sem | 7. sem | 8. sem | Roynd |
| *Grundskeið* | **Undirvísing og læring** sum umfatar Námsfrøði, lívsáskoðan og siða-læra, Námsfrøðilig sálarfrøði, barna- og ungdómsmentan, Almenn didaktikk, Mál- og lesimenning, og Vísindaástøði | 65 | x | | | x | | x | | x | x |
| | Grundskeið - føroyskt | 20 | | X | | | | | | | x |
| | Støddfrøði | 20 | | X | | | | | | | x |
| *Linjulestur* | Linjugrein 1 | 40 | | | x | x | | | | | x |
| | Linjugrein 2 | 40 | | | | | x | x | | | x |
| | Linjugrein 3 | 40 | | | | | | | x | x | x |
| | Bachelorverkætlan | 15 | | | | | | | | x | x |
| | Starvslæra | | | X | | x | | x | | x | |
| | | **240** | | | | | | | | | |

# 4 Undirvísingarhættir

Undirvísingin er í høvuðsheitum skipað sum fyrilestrar, floksundirvísing, bólkaarbeiði, skeið, venjingar, verkætlanir, starvsvenjingar og sum einsæris vegleiðing og eftirmeting.

Útbúgvingarnar á Námsvísindadeildini eru fulltíðarlestur; hetta merkir, at lesandi skulu rokna við at brúka 40 tímar um vikuna til at lesa, granska, skriva, ganga til fyrilestrar, bólkaarbeiði o.a. Stórur dentur verður lagdur á sjálvstøðugan lestur, og tí eru lutvíst fáir tímar av skipaðari undirvísing í eini floksstovu.

Vanliga eru umleið 10-15 undirvísingartímar um vikuna við skipaðari undirvísing. Harafturat skal roknast við nøkrum tímum við bólkaarbeiði o. líkn. Lesandi fáa eina lestrarskrá við byrjanini á hvørjum skeiði.

Hinir 20-25 tímarnar um vikuna eru ætlaðir til sjálvstøðugan lestur, at lesa pensum, skriva uppgávur, fyrireika seg til próvtøkur o.líkn.

## 4.1 Bólkaarbeiði

Ein partur av lesnaðinum kann verða skipaður sum bólkaarbeiði. Um lesandi taka seg úr einum bólki, ella bólkurin fer í tvíningar, so hava øll í bólkinum rætt til at brúka tilfarið, sum er framleitt í bólkinum.

## 4.2 Luttøku og møtiskylda

Lesandi hava skyldu at taka lut í allari undirvísing, vegleiðing og eftirmeting. Lesandi hava luttøkuskyldu í sambandi við tær verkætlanir, arbeiðsuppgávur, venjingar o.a., ið teimum verða álagdar, og undirvísarar hava skyldu at skráseta luttøkuna hjá lesandi. Mishald av luttøkuni kann hava við sær, at lesandi ikki kunnu verða eftirmett ella fara til próvtøku *(sí fylgiskjal 13.1).*

## 4.3 Starvslæran í útbúgvingini

Starvslæra í læraraútbúgvingini er tengd bæði at linjulestrinum og skeiðunum í undirvísing og læring.

Starvslæran fevnir um 30 praktikktímar fyrsta og annað lestaraárið og 50 tímar fyri hvørt av hinum árunum, samanlagt 160 tímar (t.e. tímar á 45 min. saman við næmingum fólkaskúlans).

Talið av samrøðutímum er 2 tímar fyri hvørja starvslæruviku. Harumframt kunnu lesandi 4. lestrarár nýta 10 praktikktímar aftrat til eygleiðing ella annað virksemi í fólkaskúlanum í samband við bachelorverkætlanina.

## 4.4 Skiftislestur

Møguligt er at taka í mesta lagi 60 ECTS frá øðrum universiteti sum skiftislesandi. Mælt verður til, at lesandi, sum hava hug at fara uttanlands sum skiftislesandi, fara 2. ella 3. árið, og taka antin eina linju (40 ECTS) og/ella pedagogisk fak svarandi til 20 ECTS. Áðrenn farið verður á skiftislestur, skulu øll fak

undangóðkennast av lestrarráðnum ella, um neyðugt, útbúgvingarleiðaranum. Lesandi sum hava áhuga í skiftislestri skulu seta seg í samband við lestrarvegleiðingina.

# 5 Raðfylgjan av fakum

Smávegis broytingar eru í støddini á onkrum skeiðum í mun til námsskipanirnar fyri ymsu árini. Tær verða tí settar upp hvør sær niðanfyri.

## 5.1 Bygnaður Námsskipan 2016-2020

Læraraútbúgvingini er býtt upp í hesar høvuðspartar:

1. Pedagogisk fak (Undirvísing og læring 1-4, íroknað mál og lesimenning og vísindaástøði) 65 ECTS
2. Føroyskt grundfak 20 ECTS
3. Støddfrøði grundfak 20 ECTS
4. Tríggjar linjugreinar á 40 ECTS 120 ECTS
5. Bachelorverkætlan 15 ECTS

*Bygnaður – námsskipan 2016-2020*

| | | | 1. árið | | 2. árið | | 3. árið | | 4. árið | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | Ects | 1. sem | 2. sem | 3. sem | 4. sem | 5. sem | 6. sem | 7. sem | 8. sem | Roynd |
| 1. lestrarár | Undirvísing og læring I | 15 | x | | | | | | | | x |
| | Mál og málmenning | 5 | x | | | | | | | | x |
| | Føroyskt – grundskeið | 20 | x | X | | | | | | | x |
| | Støddfrøði – grundskeið | 20 | x | X | | | | | | | x |
| | Starvslæra | | | X | | | | | | | |
| *2. lestrarár* | Linjugrein 1 | 40 | | | x | x | | | | | x |
| | Starvslæra | | | | | x | | | | | |
| | Undirvísing og læring II | 20 | | | | x | | | | | x |

| | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | | | | |
| *3. lestrarár* | Linjugrein II | 40 | | | | | x | x | | | x |
| | Starvslæra | | | | | | | x | | | |
| | Undirvísing og læring III | 20 | | | | | | x | | | x |
| *4 .lestrarár* | Linjugrein III | 40 | | | | | | | x | x | x |
| | Starvslæra | | | | | | | | | x | |
| | Undirvísing og læring IV (vísindaástøði) | 5 | | | | | | | | x | x |
| | B.ED-verkætlan | 15 | | | | | | | | x | x |
| | | **240** | | | | | | | | | |

Frá lestrarárinum 2019-23 eru skeiðini í linjufakum vanliga tvey skeið á 15 ECTS og eitt starvslæruskeið á 10 ECTS.

# 6 Próvtøkur og raðfylgja teirra í lestrargongdini

Próvtøkurnar og teirra raðfylgja í lestrargongdini síggjast í bygnaðinum í 5.1 og 5.2.

Próvtøkurnar í linjugreinunum eru vanliga tríggjar í tali.

## 6.1 Almennar próvtøkutreytir

Fyri at fara upp til próvtøku í einum skeiði skal lesandi skal luttikið í øllum kravdum lestrarvirkni, uppgávum, venjingum, innlatingum og royndum, sum liggja frammanundan próvtøkuni, umframt hildið kravdu møtiskylduna.

**Um lesandi ikki møtir til próvtøku og ikki hevur meldað frá henni í seinasta lagi vikudagin undan próvtøkudegnum, verður viðkomandi skrásettur fyri eina fullgilduga próvtøkuroynd við próvtalinum 00.**

Lesandi kann ikki fara upp í próvtøku í bachelorverkætlanini, fyrr enn 225 ECTS av teimum kravdu 240 ECTS eru staðin.

Lesandi kann í mesta lagi fara upp tríggjar (3) ferðir til somu próvtøku ella aðra døming. Um skeiðið ikki verður staðið við fyrstu roynd, er møguligt at fara til endurpróvtøku tvær ferðir. Dekanurin kann loyva einum lesandi at fara upp eina fjórðu (4) ferð um serlig viðurskifti gera seg galdandi.

Allar skrivligar innlatingar skulu latast inn á Moodle.

## 6.2 Førleiki í rættskriving og greiðum akademiskum málburði

Í metingini av skrivligum uppgávum er førleikin í rættskriving og greiðum akademiskum málburði partur av tí, sum verður mett, hóast høvuðsdenturin verður lagdur á, í hvønn mun tey lesandi hava nátt ásettu læruúrtøkunum.

## 6.3 Endurpróvtøka og sjúkrapróvtøka

Um lesandi ikki stendur eina próvtøku, kann hann fara til endurpróvtøku. Námsvísindadeildin ásetur tíðina. Reglurnar fyri vanligu próvtøkuna eru eisini galdandi fyri endurpróvtøkuna.

Námsvísindadeildin ásetur tíðina fyri sjúkrapróvtøku. Reglurnar fyri vanligu próvtøkuna eru eisini galdandi fyri sjúkrapróvtøkuna. Læknaváttan er kravd til sjúkrapróvtøku. Sjúkrapróvtøka telur ikki við sum endurpróvtøka. Lesandi sum ikki hevur staðið eitt kravt skeið í útbúgvingini eftir tríggjar royndir, hevur ikki møguleika at gjøgnumføra útbúgvingina.

### 6.4 Kæruviðurskifti

Kærur um próvtøkur, próvtøkuhættir, próvdøming, próvskjal ella aðra døming, sum er partur av próvtøkuni, undantikið døming av starvslæru, verða stílaðar til dekanin og latnar skrivstovuni á Námsvísindadeildini. Kæran skal vera skrivlig og grundgivin og vera latin inn í seinasta lagi 2 vikur aftaná, at dømingin er kunngjørd.

# 7 Próvtøkusløg

Tá tann lesandi er upptikin á útbúgvingina, skal eitt innskrivingarblað útfyllast og latast Lestrarskrivstovuni. Tá hetta er gjørt, er tann lesandi samstundis innskrivaður til allar próvtøkurnar í útbúgvingini.

Lesandi, sum hava verið í farloyvi, skulu melda seg til fakini, tey skulu hava, á skrivstovuni á deildini.

Próvtøka er í hvørjari lærugrein sær, og hon verður skipað eftir einum av niðanfyri standandi próvtøkusløgum, ella sum ein samanseting av hesum:

- Stórar og smáar spurdómsstýrdar uppgávur
- Stórar og smáar skrivligar uppgávur við ásettum uppgávuorðingum
- Fakligar ritroyndir
- Synopsur
- Verkligt arbeiði
- Munnligar framløgur við og uttan opponering
- Munnligar próvtøkur
- Skrivligar próvtøkur
- Portfolio
- Loggbøkur
- Starvslæra

Metingarhættirnir eru fleiri. Eftirmeting fer fram í bólki ella einsæris. Hetta verður kunnað um í skeiðslýsingunum og lestrarætlanunum til hvørt skeiðið sær.

Tey lesandi fáa nærri vegleiðing um uppgávur og próvtøkur á hvørjum skeiðið sær.

Vísindaligir tekstir eru høvuðsgrundarlagið undir øllum skrivligum uppgávum. Hvørja ferð tekstir verða brúktir, skulu kelduávísingar verða settar upp.

# 8 Próvtalsstigi

Próvdømingin verður givin sum met eftir 7-talsstiganum ella sum "staðið/ikki staðið". Fyri at hava staðið fakið krevst metið 02. Próvtalstigin er lýstur í serstakari kunngerð.

Frá lestrarárinum 2019/20 skulu minst 2/3 av próvtøkunum (160 ECTS) vera dømdar við próvtali, og í mesta lagi 1/3 av próvtøkunum (80 ECTS) kunnu verða dømdar sum staðið/ikki staðið. Próvtøkutreytirnar í teimum einstøku skeiðunum standa í skeiðslýsingunum.

# 9 Innansetturs ella uttansetturs próvdøming

Próvdømingin kann vera við uttansetturs ella við innansetturs próvdómara. Tá próvdømingin er uttansetturs verður avrikið dømt av undirvísaranum og einum próvdómara, sum ikki er í starvi á Fróðskaparsetrinum. Uttansetturs próvdómarar skulu góðkennast av Mentamálaráðnum. Tá próvtøkan er innansetturs, verður avrikið dømt av undirvísaranum og einum vísindastarvsfólki á Fróðskaparsetrinum.

Frá lestrarárinum 2019/20 skulu minst 2/3 av próvtøkunum (160 ECTS) vera dømdar av uttansettursprovdómara, og í mesta lagi 1/3 av próvtøkunum (80 ECTS) kunnu verða dømdar av innansetturs próvdómara. Próvtøkutreytirnar í teimum einstøku skeiðunum standa í skeiðslýsingunum.

# 10 Ásetingar um bachelorritgerð

Fjórða lestrarár endar endar við bachelorverkætlan, ið telur 15 ECTS-stig. Verkætlanin skal verða rættað móti endamálinum við útbúgvingini til B.Ed innan fólkaskúlayrkið, og skal hava slíkt støði, at hon verður viðurkend sum grundarlag undir framhaldslestri, bæði í Føroyum og uttanlands.

Bachelorverkætlanin skal hava ein almennan didaktiskan ella fakdidaktiskan part, ið fevnir um minst triðing av uppgávuni.

Fyri at kunna fara upp í próvtøku í bachelorverkætlanini skal tann lesandi hava staðið øll skeið (í minsta lagi 225 ECTS) og lokið møgulig onnur krøv í útbúgvingini.

Endamálið við ritgerðini er at lesandi seta seg inn í praktisku, fakligu og námsfrøðiligu avbjóðingarnar í lærarayrkinum. Lesandi skulu viðgera viðkomandi spurningar í starvsøkinum, har ið tey samantvinna vísindaligt ástøði og háttalag við egnar royndir.

Ritgerðin verður skipað kring ein spurdóm. Spurdómurin skal grundast í fakligum og/ella námsfrøðiligum avbjóðingum, sum eru týðandi fyri skúlans virksemi. Tann lesandi orðar sín spurdóm í samráð við vegleiðaran.

Bachelorverkætlanin kann skrivast einsæris ella í bólki við í mesta lagi 3 luttakarum.

Bachelorverkætlanin endar við einsæris munnligari próvtøku, sum hevur sítt støði í ritgerðini, og har tann einstaki ábyrgdast alla ritgerðina.

Eitt prófvtal verður givið fyri samlaða avrikið.

Lærara- og námsfrøðingalesandi kunnu í bólki verða saman um at skriva bachelorverkætlan.

Nærri reglur um bachelorverkætlanina eru ásettar í uppritinum *Bachelorverkætlanin – reglur og mannagongdir*.

# 11 **Onnur** viðurskifti

## 11.1 Reglur um stuldur og svik í skrivligum uppgávum

Ritstuldur og svik verður ikki góðtikið. Verður stuldur og svik avdúkað í skrivligum uppgávum, bæði próvtøkuuppgávum og øðrum innlatingum, fær hetta avleiðingar, og í ringasta føri kann tað merkja burturvísing av Fróðskaparsetrinum *(sí lestrarhandbókina fyri Fróðskaparsetur Føroya).*

Tann lesandi má fylgja reglunum um vísindaligt rættlæti. Tað er óreiðiligt at lata vera við at uppgeva/dylja á slíkan hátt, at villleiðing stendst av viðvíkjandi avriki hjá viðkomandi lesandi. Til dømis metist tað sum dyljing ikki at geva upp allar heimildir til ritgerð. Avskrift og eftirgerð av tekstum hjá øðrum er falsan, um ikki greitt verður tilskilað, hvat er sitat, og hvat er endursøgn av teksti hjá øðrum, og hvaðani hugmyndir, sum ikki eru almennar og ikki eru tær hjá tí lesandi, eru fingnar.

Verður stuldur og svik avdúkað í skrivligum uppgávum, bæði próvtøkuuppgávum og øðrum innlatingum, verður hetta revsað, og í ringasta føri kann tann lesandi verða burturvístur av Fróðskaparsetrinum.

Øll endurgáva, sum verður gjørd uttan at gera vart við, at hetta eru tankar hjá einum øðrum, er svik og verður revsað. Dømi, sum heilt greitt eru svik, er at lata uppgávu inn, sum tann lesandi ikki sjálvur hevur skrivað ella at lata somu uppgávu inn til fleiri próvtøkur.

At endurnýta partar av eini uppgávu, ið er latin inn til annað skeið, er somuleiðis svik.

## 11.2 Góðskriving

Um lesandi hevur staðið fak á øðrum universitetum, sum eru á sama ella hægri fakligum støði við sama fakliga innihaldi og/ella kunnu stuðla undir útbúgvingina sum heild, kunnu tey søkja um at fáa hesi fak góðskrivað, sum partar av útbúgvingini á Fróðskaparsetrinum. Tó kunnu í mesta lagi 45 ECTS góðskrivast. Endalig avgerð, um skeið verður góðskrivað, verður tikin av lestrarráðnum. Umsókn um góðskriving skal latast deildarskrivaranum á Námsvísindadeildini.

Søkjast kann leypandi gjøgnum árið, men um lesandi ynskja at umsóknin skal verða viðgjørd, áðrenn skeiðið byrjar, so er freistin hendan:

Seinasta freist fyri skeið sum byrja á vári: 1. oktober

Seinasta freist fyri skeið sum byrja á heysti: 1. mars

Nærri kunning um góðskrivingar, mannagongdir og oyðubløð eru at finna á heimasíðu Setursins.

## 11.3 Farloyvi

Søkjast kann um farloyvi umvegis deildarskrivstovuna á Námsvísindadeildini. Eru ivamál í hesum høpi, verður víst til lestrarvegleiðaran.

## 11.4 Útskriving

Velur tann lesandi at útskriva seg frá lestrinum, verður hetta gjørt við at venda sær til deildarskrivstovuna á Námsvísindadeildini og við at útfylla oyðublað til hetta endamál. Gerast skal vart við, at um tann lesandi ynskir at byrja lesturin aftur, skal hann/hon søkja umaftur á jøvnum føti við onnur lesandi.

## 11.5 Samskifti

Samskifti við tey lesandi fer einans fram umvegis teirra lestrarteldupostadressu og ígjøgnum Moodle. Øll skeið verða samskipað umvegis Moodle, við undirvísingarætlan viku fyri viku. Á Moodle koma boð um hvussu innlating til próvtøku fer fram.

## 11.6 Námsstig og arbeiðstyngd

Námsstig eru ein roknieind fyri støddina á einum skeiði og arbeiðsbyrðuna hjá tí lesandi. Hon verður uppgjørd eftir evropeisku ECTS skipanini (European Credit Transfer System). Hetta er ein felags skipan, sum ger tað lættari at flyta avrik millum lond og útbúgvingar. Námsstigini verða uppgjørd soleiðis:

1 ECTS svarar til 25-30 arbeiðstímar hjá tí lesandi – alt íroknað (fyrireiking + undirvísing + bólkaarbeiði + venjingar og próvtøka)

Eitt 10 ECTS skeið svarar sostatt til 275 arbeiðstímar hjá tí lesandi. Ein fulltíðarlesandi hevur 30 ECTS hvørja lestrarhálvu, og skal tí rokna við at brúka 825 arbeiðstímar hvørja lestrarhálvu.

## 11.7 Lestrarárið

Lestrarárið byrjar í viku 34 og endar í viku 25. Eingin undirvísing, sum er kravd í sambandi við útbúgvingina, fer fram uttanfyri hetta tíðarskeiðið.

## 11.8 Eftirmeting av skeiðum, linjum og ritgerð

Fyri at menna og góðskutryggja útbúgvingina, verða øll skeið, linjur og ritgerð eftirmett við eftirmetingarskjali. Starvsfólk frá fyrisitingini fyriskipa og fremja hesa eftirmeting.

Allar eftirmetingar eru dulnevndar.

## 12 Treytir um broyting í námsskipan

Útbúgvingarleiðarin kann gera uppskot til broytingar í námsskipanini, og hesar skulu góðkennast av lestrarráðnum. Lestrarráðið kann eisini heita á útbúgvingarleiðaran og viðmæla broytingar í námsskipanini. Møguligar broytingar koma í gildi við lestrarársbyrjan.

Um størri broytingar verða gjørdar í námsskipanini, skulu lesandi hava møguleika at gera seg lidnan eftir tí námsskipan, sum var galdandi, tá ið tey vóru innskrivað sum lesandi á Námsvísindadeildini, ella hava møguleika at fylgja einari skiftisskipan góðkend av lestrarráðnum.

Námsskipanin skal vera tøk á heimasíðu Fróðskaparsetursins.

# 13 Fylgiskjal

## 13.1 Luttøku- og møtiskylda

Sambært § 3 í Kunngerð nr. 149 frá 13. november 2009 um útbúgving av fólkaskúlalærarum og námsfrøðingum hava lesandi skyldu til at luttaka í allari undirvísing, vegleiðing og eftirmeting, sum stovnurin skipar fyri.

Lærararnir hava skyldu til at skráseta luttøkuna, og mishald av luttøku kann hava við sær, at lesandi ikki kunnu verða eftirmett ella fara til próvtøku.

Luttøkuskyldan verður býtt upp í :

1. Luttøkuskyldu

2. Møtiskyldu

Tey lesandi skulu verða kunnað um luttøku- og møtiskylduna við lestrarbyrjan í øllum skeiðum.

**1. Luttøkuskylda**

Lesandi hava skyldu til aktivt at taka lut í teimum lestrarskeiðum og tiltøkum , sum verða skipað í útbúgvingini.

Luttøkuskyldan fatar bæði um avbjóðingar í einstaklings- og felagshøpi. Tann einstaki lesandi hevur ábyrgdina av síni egnu útbúgving, men skal harumframt eisini taka lut í tiltøkum saman við øðrum. Talan er millum annað um at lata inn kravdar uppgávur umframt aktiv luttøka í bólkaarbeiði, verkætlanum og felagstiltøkum, ið eru partar av undirvísingini.

Samstarv, samskifti og dialogur eru týðandi tættir í lærara- og námsfrøðingayrkinum, og tí hevur tað stóran týdning, at tann lesandi í sínari útbúgving sýnir, at hon/hann umframt fakligan dugnaskap og ídni eisini megnar hesar tættir í síni lestrartíð. Samanumtikið kann sigast, at luttøkuskyldan skal skiljast sum aktiv luttøka í teimum undirvísingargongdum og tiltøkum, sum verða skipað í útbúgvingini.

Um ein lesandi kann skjalprógva vantandi luttøku við læknaváttan ella á annan hátt, verður hædd tikin fyri hesum í skrásetingini.

Í teimum førum, har luttøkuskyldan verður mishildin, verður farið fram sambært niðanfyri standandi reglum um hesi viðurskifti.

***Luttøkuskyldan mishildin:***

Einstaki undirvísarin skrásetir luttøku teirra lesandi og hevur skyldu til at gera tann lesandi varan við møguligt mishald í sambandi við luttøkuskylduna.

Er luttøkuskyldan mishildin, kann undirvísarin gera av um lesandi skulu:

(1) upp í fullum pensum við skeiðslok

(2) skriva eina einstaklingsuppgávu

(3) taka skeiðið umaftur

**2. Møtiskylda**

Lesandi hava skyldu til at møta upp til undirvísing, vegleiðing og eftirmeting í sambandi við øll skeið í útbúgvingini. Møtiskyldan fatar um allar partar av útbúgvingini, har ein lærari/gestalærari er hjástaddur í sambandi við frammanundan fyrireikað undirvísingar- ella lestrarvirksemi.

Møtiskyldan fatar eisini um starvslæruna, og tá hevur praktikklærarin/-skúlin ábyrgdina av at skráseta uppmøting teirra lesandi.

Tann einstaki lesandi hevur rætt til innlit í sína skráseting, bæði hjá Námsvísindadeildini og hjá starvslæruskúlanum.

Um ein lesandi kann skjalprógva fráveru við læknaváttan ella á annan hátt, verður hædd tikin fyri hesum, tá ið frávera verður gjørd upp.

Í teimum førum, har møtiskyldan ikki er uppfylt, verður farið fram sambært niðanfyri standandi reglum um hesi viðurskifti.

***Møtiskyldan mishildin (undirvísing):***

Einstaki undirvísarin skrásetir luttøku teirra lesandi og hevur skyldu til at gera tann lesandi varan við møguligt mishald í sambandi við møtiskylduna.

Er lesandi burtur meiri enn 25% av undirvísingartíðini uttan haldgóða grund, skal viðkomandi, umframt vanligu uppgávurnar, annaðhvørt:

(1) til munnliga roynd í fullum pensum við skeiðslok

(2) til skrivliga 6-tímaroynd við skeiðslok

(3) ella skriva eina einstaklingsuppgávu

Avvarandi undirvísari avgerð hvørja roynd ella uppgávu, hin lesandi skal gera.

Er lesandi burtur meiri enn 40% av undirvísingartíðini, fær viðkomandi boð um:

(4) at taka skeiðið umaftur

*(Gevið gætur: Í hesum føri er ”haldgóð” grund ikki galdandi)*

Um lesandi er burtur meiri enn 40% av undirvísingartíðini í tveimum ella fleiri skeiðum skeiðum, verður lesturin hjá viðkomandi tikin upp til viðgerðar í leiðsluni, og verður viðkomandi møguliga biðin um at steðga við útbúgvingini.

***Møtiskyldan mishildin (starvsvenjing):***

Praktikkskúlin/-lærarin boðar frá, hvussu tann lesandi hevur møtt upp til ráðlagda undirvísing og onnur kravd tiltøk í starvsvenjingartíðarskeiðinum. Um mett verður, at møtiskyldan er mishildin, verður avgerð tikin um, hvørjar avleiðingar hetta skal fáa. Talan kann í slíkum føri vera um, at tann lesandi skal taka írestandi partarnar av starvsvenjingini ella – tá fráveran hevur verið ov stór – alla starvsvenjingina umaftur. Hetta kann hava við sær, at starvsvenjingin fyri viðkomandi tíðarskeið ikki verður góðkend.

**Námsvísindadeildin 2017**

# MANNAGONGDIR

*- samstarvið millum undirvísara,*
*útbúgvingarleiðara og fyrisiting*

*(lærararaútbúgvingin)*

Námsvísindadeildin
Fróðskaparsetur Føroya

1. **Væl áðrenn skeiðið byrjar:** Tríggjar til fýra vikur áðrenn eitt skeið byrjar, skal skeiðslýsingin sendast til Hans Harryson, útbúgvingarleiðara (hansh@setur.fo). Um Hans Harryson ikki hevur nakra viðmerking, so sendur hann lýsingina til Ásu Olsen, deildarskrivara (asao@setur.fo), sum hevur til uppgávu at leggja skeiðslýsingarnar inn í Próvbókina. Um lýsingin ikki lýkur tey krøv, ið Góðskueindin setur, so bøta undirvísarin og útbúgvingarleiðarin um tekstin, áðrenn hann verður sendur Ásu.

2. **Lestrarætlan:** Vit nýta ein og sama skrokk (skabelón) til øll skeið á lærarautbúgvingini.
    a. Undirvísarar fáa skrokkin sum elektroniskt skjal. – Tað, ið skal standa í lestrarætlanini, er:
        i. Grundleggjandi upplýsingar um skeiðið (undirvísingarstað, undirvísingartíð, grundbøkur o.a.)
        ii. Skeiðslýsingin
        iii. Hvørji temu ein arbeiðir við frá degi til dags
        iv. Hvørjar bókmentir ein lesur frá ferð til ferð
        v. Samlaður bókmentalisti
        vi. <u>Gevið gætur:</u> Tað skal vera samanhangur millum (1) innihald/læruúrtøku í skeiðslýsingini, (2) tey temu, ið ein arbeiðir við á skeiðnum og (3) tær bókmentir, ein lesur

Upprunaliga lestrarætlanin kann sjálvandi broytast eitt sindur, sum skeiðið gongur. Bókmentir kunnu t.d. leggjast afturat og/ella skiftast út. Undirvísarar verða bidnir um at dagføra ætlanina so hvørt og at senda endaligu lestrarætlanina til útbúgvingarleiðaran við skeiðslok.

3. **Eftirmeting:** Fyrsta undirvísingardag á hvørjum skeiði koma útbúgvingarleiðarin og Elsa Maria Højgaard Hansen, samskipari á NÁD (elsamh@setur.fo) út í flokshølið at eftirmeta skeiðið, ið júst er lokið
    a. EMHH setir seg í samband við avvarðandi undirvísarar og spyr, nær EMHH og HH kunnu koma inn við eftirmetingarskjalinum
    b. Eftirmetingin er elektronisk og tekur umleið 15 min.
    c. Undirvísarin er <u>ikki</u> til staðar í flokshølinum, meðan tey lesandi eftirmeta skeiðið

d. Utbúgvingarleiðarin kunnar undirvísaran um eftirmetingarúrslitið skjótast til ber. Hetta kann verða gjørt á einum fundi millum undirvísaran og útbúgvingarleiðaran ella sum ein skrivlig fráboðan
e. Eftir próvtøkuna í hvørjum skeiði, skal undirvísarin gera sína egnu eftirmeting av skeiðnum. Eftirmetingarfrágreiðingin skal sendast til útbúgvingarleiðaran.

   Gev gætur: Allir undirvísarar nýta sama skrokk til hetta arbeiðið. Tit fáa skrokkin sum elektroniskt skjal (sí viðfestið).

4. **Moodle:** Moodle er elektroniski lærupallurin á læraraútbúgvingini. Hetta skal undirvísarin leggja á Moodle
   a. Skeiðslýsingina. *(Undirvísarin gjøgnumgongur skeiðslýsingina saman við teimum lesandi fyrsta undirvísingardag á hvørjum skeiði)*
   b. Lestrarætlanina
   c. Alt tilfar, ið verður nýtt á skeiðnum. (Grundbøkur eru ikki íroknaðar)
   d. PP-framløgur – eisini hjá gestafyrilestrahaldarum, um hetta er møguligt
   e. Lestraruppgávur av ymiskum slagi
   f. Allar skrivligar próvtøkuuppgávur. Hesar skulu latast inn sum pdf-fíla á Moodle, soleiðis at tær kunnu fara ígjøgnum plagiateftirlitið og verða goymdar á einum tryggum staði

   Gevið gætur: Elsa Maria Højgaard Hansen kann hjálpa undirvísaranum at gera eina skjáttu til próvtøkuinnlatingar

5. **Próvtøkuháttur og próvtøkuúrslit:** Hesar reglur eru galdandi:
   a. Í minsta lagi ein próvtøka í hvørjari linjugrein skal vera skrivað og/ella vard einsæris
   b. Í minsta lagi ein próvtøka í U&L skal verða skrivað og/ella vard einsæris
   c. Linjugreinarnar eru skipaðar sum trý skeið. – Tey lesandi fáa próvtal í tveimum skeiðum og staðið/ikki staðið í einum skeiði
   d. U&L er sett saman av fýra skeiðum. – Tey lesandi fáa próvtal fyri tvey skeið og staðið/ikki staðið fyri tvey skeið

6. **Próvtøkan.** Reglan er tann, at øll, ið eru innskrivað á eitt skeið á NÁD, verða av sær sjálvum meldað til próvtøku í hesum sama skeiði. Um onkur er, sum ikki kann fara til próvtøkuna, skal váttan fáast til vega, og avtala skal gerast um nýggjan próvtøkudag

   Í sambandi við próvtøkuna er mannagongdin henda:

   a. Eina viku undan próvtøkuni skal undirvísarin boða Ann Ísheim Davidsen, skrivara á NÁD, (annd@setur.fo) frá hesum:
      i. Hvør skal til próvtøku? (T.e. navn á linju ella navn á skeiði)
      ii. Nær próvtøkan verður?
      iii. Hvar próvtøkan verður?
      iv. Hvør verður próvdómari?
      v. Er tørvur á próvtøkuvaktum?
      vi. Vilja undirvísari og próvdómari hava smurt breyð frá kantinuni próvtøkudagin? *(Gevið gætur: Undirvísarin syrgir sjálvur fyri, at tað er kaffi og vatn í próvtøkuhølinum)*

   b. Ann Ísheim Davidsen útskrivar prívbókabløðini og innskrivar próvtølini eftir próvtøkuna
      i. Áðrenn próvtøkuna: Undirvísarin kannar, um nøvnini hjá øllum teimum lesandi, ið skulu til próvtøku, standa á próvbókablaðnum
      ii. Eftir próvtøkuna: Undirvísarin útfyllir próvbókablaðið, og próvdómarin skrivar undir

   c. Ása Olsen, deildarskrivari, hevur til uppgávu at løna próvdómarum. Undirvísarin tryggjar, at Ása fær neyðugar upplýsingar um
      i. Uppgávuslag
      ii. Uppgávuvav
      iii. Próvtøkuhátt
      iv. Um uppgávan er skrivað og/ella vard einsæris ella í bólki
      Gevið gætur: Skrivstovan hevur orðað eitt skjal til hetta endamálið. Tað er uppgávan hjá undirvísaranum at fáa próvdómaran at útfylla hetta skjalið eftir próvtøkuna og at tryggja, at upplýsingarnir eru rættir.

7. **Starvslæran.** Reglan er tann, at tey lesandi fara í starvslæru í fólkaskúlanum
    a. 1. árgangur (3 vikur – 30 tímar til samans)
    b. 2. og 3. árgangur (5 vikur – 50 tímar til samans). Harav
        i. í linugreinini (3 vikur – 30 vikur til samans)
        ii. í U&L (2 vikur – 20 tímar til samans)
    c. 4. árgangur (3 vikur – 50 tímar til samans)
    d. Reglan er tann, at lesandi fara í starvslæru annaðhvørt einsæris ella í tveymansbólkum. (Í serligum føri kunnu undantøk gevast)
    e. Starvslæran í linjugreinunum 2020/2021 er í tíðarskeiðnum 25/1 til 12/3-2020 (t.e. vika 4-10)
        i. Linjugreinalærarin ger sjálvur av, hvørjar vikur starvslæran verður lisin í nevnda tíðarskeiði
    f. Vegna koronasmittuna hava lesandi ikki møguleika at fara uttanlands í starvslæru í 2020/2021
    g. Linjugreinalærarin ger avtalu við starvslæruplássið og gevur teimum allar neyðugar upplýsingar. Har ímillum eftirmetingarskjal og samsýningarskjal
    *h.* Linjugreinalærarin skal senda útbúgvingarleiðaranum og Ásu Olsen eitt yvirlit, ið vísir, í hvørjum skúla tey lesandi eru í stavslæru, og hvør starvslærarin er. *(Gevið gætur: Tað er týdningarmikið at viðmerkja, hvør er í starvslæru einsamøll/einsamallur, og hvør er í bólki)*
    i. Ann Ísheim Davidsen hevur til uppgávu at innsavna starvslæru-eftirmetingarfrágreiðingar og at senda tær víðari til undirvísaran. Ása og Ann samstarva um hetta, so løn bert verður goldin til teir starvslærarar, ið hava útfylt eftirmetingarskjalið
    j. Um onkur starvslærari ikki hevur latið eftirmetingarfrágreiðingina inn áðrenn evsta mark, so er tað uppgávan hjá undirvísaranum at senda eina áminning
    k. Áðrenn tey lesandi standa starvslæruskeiðið, skal linjugreinalærarin hava lisið og góðkent einstøku starvslærueftirmetingina
    l. Samsýningin fyri starvslæruna pr. 1.okt. 2020:
        i. Starvslærarin fær 113,09 kr,- fyri hvønn undirvísingartíma
        ii. Starvslærarin fær 205,61 kr,- fyri hvønn samrøðutíma
        iii. Leiðslan fær 6,17 kr,- (starvslærutímar + samrøðutímar)

    Gevið gætur: Vit fara at gera eina talgilda skipan, har starvslæruplássið kann flyta (uploada) starvslærufrágreiðingina beint eftir starvslæruna. (Tit frætta nærri, tá ið henda skipanin er sett í verk).

## EFTIRMETINGARFRÁGREIÐING

<table>
<tr><td colspan="6">Skeiðsheiti</td></tr>
<tr><td colspan="6"></td></tr>
<tr><td colspan="6">Grundleggjandi upplýsingar</td></tr>
<tr><td colspan="2">Námsstig</td><td colspan="2">Tíðarskeið</td><td colspan="2">Undirvísingarhøli</td></tr>
<tr><td colspan="2"></td><td colspan="2"></td><td colspan="2"></td></tr>
<tr><td colspan="2">Undirvísingardagar og tíð</td><td colspan="2">Tal av lesandi</td><td colspan="2">Undirvísari</td></tr>
<tr><td colspan="2"></td><td colspan="2"></td><td colspan="2"></td></tr>
<tr><td colspan="6">Hvat eyðkennir árgangin/tey, ið taka linjugreinina?</td></tr>
<tr><td colspan="6"></td></tr>
<tr><td colspan="6">Hvat gekk væl hetta skeiðið?</td></tr>
<tr><td colspan="6"></td></tr>
<tr><td colspan="6">Hvat gekk minni væl hetta skeiðið?</td></tr>
<tr><td colspan="6"></td></tr>
<tr><td colspan="6">Hvat eigur kanska at verða tillagað og/ella broytt næstu ferð ella næsta ár?</td></tr>
<tr><td colspan="6"></td></tr>
<tr><td colspan="6">Próvtøkuúrslit</td></tr>
<tr><td colspan="6"></td></tr>
<tr><td colspan="6">Eru lesandi, ið hava serligar avbjóðingar?</td></tr>
<tr><td colspan="3">Ja</td><td colspan="3">Nei</td></tr>
<tr><td colspan="3"></td><td colspan="3"></td></tr>
<tr><td colspan="6">Viðmerkingar</td></tr>
<tr><td colspan="6"></td></tr>
</table>

| **UPPLÝSINGAR Í SAMBANDI VIÐ PRÓVTØKUNA** | | | |
|---|---|---|---|
| Skeiðsheiti, skeiðsnummar og undirvísari | | | |
| | | | |
| Námsstig | | | |
| | | | |
| Próvtøkuorðing<br>*(ein gjøllari lýsing kann leggjast við sum fylgiskjal)* | | | |
| | | | |
| Próvtøkuháttur<br>*(setið eitt ella tvey x niðanfyri)* | | | |
| Skrivlig roynd á NÁD | Styttri uppgáva (3 til 6 síður) | Longri uppgáva (yvir 7 til 13 síður) | Samansett próvtøka (t.d. tekstur, framløga, handaligt produkt og/ella framsýning) |
| | | | |
| Munnlig roynd á NÁD | Styttri uppgáva við munnligari verju | Longri uppgáva við munnligari verju | Annað |
| | | | |
| Hvussu langur var teksturin og/ella hvussu drúgv var framløgan? | | | |
| Skrivligur partur | | Munnligur partur | |
| | | | |
| Próvtøkuslag | | | |
| Einsæris | Bólkaarbeiði | Skriva í bólki og verja einsæris | Annað |
| | | | |
| Próvdøming | | | |
| Innanhýsis | | Uttanhýsis | |
| | | | |
| Próvmeting | | | |
| Próvtal | | Staðið/ikki staðið | |
| | | | |
| Tíðarskeið | | | |
| Próvtøka (vika) | | Endurpróvtøka (vika) | |
| | | | |
| Viðmerkingar og/ella neyvari lýsing | | | |
| | | | |